Nr. 22 • November 2014

# MIÐ & MAGN



Føroya Skipara- og Navigatørfelag & Maskinmeistarafelagið

ÚTGEVARI
Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag geva MIÐ & MAGN út í felag.
Blaðið verður sent limunum og teimum, sum tekna hald.
4 útgávur eru um árið.

BLAÐNEVND
Eyðstein Djurhuus, *ábyrgdarblaðstjóri*
Páll Hansen
Annfinn Garðalíð
Jóan Petur Patursson

MASKINMEISTARAFELAGIÐ
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Telefon 314718
Teldupostur: mf@mf.fo

FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG
Jekaragøta 10
Postboks 248
110 Tórshavn
Telefon: 316973
Teldupostur: fsn@fsn.fo

BLAÐHALD
Tey, sum ynskja at halda MIÐ & MAGN, kunnu boða frá hesum í teldupost til:
info@midogmagn.fo
Haldara gjaldið er 200,- kr. um árið, tað er fyri 4 bløð.

ENDURGEVING
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MIÐ & MAGN, tá keldan verður upplýst.
MIÐ & MAGN kann heintast í PDF á heimasíðunum hjá feløgunum:
www.mf.fo
www.fsn.fo



FORSÍÐUMYND
West Hercules á Skálafjørðinum á veg til Kanada.

PDF ÚTGÁVA
Mið og Magn kann ókeypis heintast sum PDF á:
www.fsn.fo
www.mf.fo

UMSITING
Sp/f MEDIA
info@midogmagn.fo

UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ
Føroyaprent · www.foroyaprent.fo

Upplag: 1.850

# Er talan um eitt framstig ella eitt afturstig?



*Eyðstein Djurhuus, ábyrgdarblaðstjóri*

Vinnumálaráðið hevur í tíðindaskrivi boðað frá at játtanin til Sjóvinnustýrið hækkar munandi í 2015. Sambært uppskoti til fíggjarlóg so hækkar játtanin til stovnin við 1, 8 mill. Orsøkin til hesa vælvild kann lýsast við hesum brotinum úr nevnda skrivi

„Skipaeftirlitið fer komandi ár at gera samstarvsavtalu við Den Maritime Havarikommision. Nýggja samstarvsavtalan fer at hava við sær, at kanningararbeiðið í sambandi við óhapp og vanlukkur á sjónum, verður styrkt."

Í tekstinum til lógaruppskot til fíggjarlóg, kann ein fáa tað fatan at hendan avtala er longu gjørd. Sí hetta broti.

„Tað er avtalað við donsku havaríkommisiónina, um at hjálpa til við til at kanna vanlukkur á sjónum. Peningur verður eftir ætlan játtaður til endamálið frá 2015."

Tað er avgjørt eitt framstig at meira orka verður brúkt til at kanna vanlukkur á sjónum væl og virðiliga. Hetta er nokk eisini ein viðurkenning frá okkara myndugleikum av, at hendan uppgávan ikki hevur verið røkt nóg væl higartil.

Um ætlanin er at útveita hesa uppgávu ímóti gjaldi til donsku Havaríkommisiónina, so er heilt greitt talan um eitt afturstig. Stórur vandi er fyri, at vitan og menning hvørvur úr okkara Sjóvinnustýrið um hendan uppgávan verður útveitt.

Fyri knappar 2 mió. um árið kann nógvur sakkunnleiki mennast her heima. Føroyar eru í tí hepnu støðu, at vit hava nógv fólk við fjøltáttaðum serkunnleika á flest øllum maritimum økjum.

Vit eiga at umhugsa um hetta er rætta kósin, sum Vinnumálaráðið og Sjóvinnustýrið hava sett í kortið.

*Vegna Mið og Magn*
*Eyðstein Djurhuus, ábyrgdarblaðstjóri*




8 Ólógligar mynstringar

# Innihaldsyvirlit

Er talan um eitt framstig ella eitt afturstig? .......... 2
Sólvág Rúnadóttir og skúlaskipið Danmark .......... 4
TEMA: Ólógligar mynstringar .......... 8
Útlendingastovan: Skerdur fuglur við lítlum flogi .......... 14
Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum .......... 16
Tíðindi frá Skipara- og Navigatørfelagnum .......... 18
Føðingardagar hjá limum okkara .......... 20
Brennidepilin: Hallur Mohr .......... 22
Oljuvinnan í eini rembingartíð .......... 24
Botnfiskastovnarnir: Sterkir stovnar klára ringar tíðir .......... 26
Sildastovnarnir: Felags fatan av sildastovninum .......... 28
Pionerar á landleiðini .......... 32
Søgulig brot: Tørvur á nýggjum fiskileiðum .......... 36
Oljupallurin West Hercules .......... 38



24 Oljuvinnan í rembing



28 Felags fatan



32 Pionerar á landleiðini

SKÚLASKIPIÐ DANMARK



Sólvág Rúnadóttir í uniformi á dekkinum umborð á skúlaskipinum Danmark.

Tað øraði fyri mær - fyrstu ferð eg hugdi upp í mastrarnar. Man eg fara at tora heilt upp har, spurdi eg meg sjálva ? Eg stóð bara og stardi upp í mastrarnar; tær eru 40 metrar høgar.

# Sólvág Rúnadóttir og skúlaskipið Danmark

Í rigninginum eru átta kilometrar av reipi, har eru 336 ymiskir endar, hvør við sínum navni og endamálið. So tað er ikki onki – at halda skil á, sigur Sólvá, blídliga, tá ið vit spyrja, hvussu tað er at sigla við skúlaskipinum Danmark. Og hon leggur afturat, eg kendi meg altíð trygga og fekk eitt tað besta minnið eg eigi.

Áðrenn vit sluppu umborð skuldu vit luttaka á einum fyrireikandi skeiði í Fredrikshavn, tað tók tríggjar dagar, og hevði til endamáls at læra okkum til at liva og arbeiða umborð á einum av heimsins kendastu seglskipum – soleiðis greiðir Sólvá okkum lætt og livandi frá. Hon er fødd og uppvaksin á Tvøroyri, er 22 ára gomul, og sum prátið gongur, fáa vit eina kenslu av, at hon altíð hevur dámt væl avbjóðingar. Tað var í desember 2012, at hon sendi umsóknina um at sleppa við skipinum. Men áðrenn hon kundi fáa endaligt svar skuldi hon hava eina samrøðu við yvirstýrimannin yvir Skype. Tann samrøðan hevur helst gingið væl, tí 18. desember 2012 fekk hon játtandi svar, og fekk samstundis at vita, at hetta var ferð nr. 100 hjá skúlaskipinum Danmark.

## Ongar sengur at sova í

Sum nevnt varð skipað fyri einum fyrireikandi skeiði áðrenn farið varð umborð. Ein partur av innihaldinum var at læra knútarnar, ið verða brúktir til heingikoyggjuna, sum vit skuldu sova í. Ongin song er umborð, men tað gjørdist ongin trupulleiki.

Vit lærdu eisini hvørjar mannagongdir eru galdandi. Tá ið vit byrjaðu vóru vit 82 næmingar, og vit vóru øll í somu støðu; tí hevði tað stóran týdning, at vit fingu høvið at práta saman áðrenn vit fóru umborð.

Tað verður altíð roknað við fráfalli, men ikki var tað stórt hjá okkum; vit vóru 81, tá ið vit vóru til reiðar at fara umborð.

## Ferðin byrjar í Århus

Vit mynstraðu í Århus tann 9. juli 2013. Tá høvdu vit fingið „uniformar". Vit mynstraðu á dekkinum við koyggjusekkinum framman fyri okkum. Allir yvirmenninir stóðu á dekkinum og eygleiddu okkum fyri fyrstu fer, øll í fínasta skrúð.

Fyri at gera alt meira einfalt fingu næmingarnir hvørt sítt tal, tey við líka talið vóru á bakborðsvaktini, meðan ólíka tøl vóru í stýriborð. Eg gjørdist partur av bakborðsvaktini, og var umborð bara nevnd „61".

Koyggjurnar vóru skipaðar á sama hátt; eg hevði uml. 3/4 av einum metri til mína heingikoyggju ímillum nummar 59 og 63, ið báðir vóru dreingir.

Ongin orka varð brúkt uppá at skilja sundur kynini. Umborð vóru 55 dreingir og 26 gentur. Átta vesiklivar vóru til taks undir bakkanum, so runt roknað vóru 10 næmingar til hvørt vesi. Fimm brúsur vóru – tvær í bakborð og tríggjar í stýriborð.

## Ymisk og tó

Vit vóru øll ótrúliga ymisk, men tað gjørdi bara avbjóðingina meira spennandi, tá vit skuldu læra at arbeiða saman, um tað so var at skrubba dekk, pakka segl í 37 metra hædd mitt um náttina, ella vakt í kabússini.

Teir flestu næmingarnir vóru úr Danmark, men har vóru eisini onnur lond umboðað, eg kann nevna, at tvær gentur vóru úr Norra, ein úr Avstralia, ein úr Póllandi og ein úr Fraklandi. Ein kvartermeistari var úr Hollandi og ein bátsmaður úr Spania. Málið, ið tosa var umborð, var enskt.

## Tær fyrstu vikurnar

Hvønn morgun – tær fyrstu tvær vikurnar – skuldu vit mynstra við heingikoyggjuna, so kvartermeistarin hjá okkum kundi kanna um heingikoyggjan var rætt pakka saman.

Vit svóvu, ótu og høvdu skúla-



Hetta gjørdist skjótt gerandiskostur – hóast mastranar eru 40 metrar høgar.

| Okkara farleið, sum var ferð nr. 100 | |
|---|---|
| 4. juli 2013 | Forskúli á MarTec, Frederikshavn |
| 9. juli | Mynstra í Århus |
| 11. juli | Fráferð, Århus |
| 17. juli | Koma, Nakskov |
| 19. juli | Fráferð, Nakskov |
| 28. juli | Koma, Mariehamn, Álandsoyggjarnar |
| 30. juli | Fráferð, Mariehamn |
| 4. august | Koma, Keypmannahavn |
| 5. august | Fráferð, Keypmannahavn |
| 13. august | Koma, Rouen, Frakland |
| 16. august | Fráferð, Rouen |
| 30. august | Koma, Tenerifa, Spania |
| 3. september | Fráferð, Tenerifa |
| 13. september | Koma, Asorurnar Portugal |
| 17. september | Fráferð, Asorurnar |
| 27. september | Koma, Lissabon, Portugal |
| 7-9. oktober | Mynstra av í Lissabon |
| 21. oktober | Amboðsskúli á MarTec, Frederikshavn |
| 29. november | Handað prógv sum „ordinary seamen" |



*Hetta er mítt privata umborð– alt annað er felags.*

tímar dagliga í sama rúmi, so alt skuldi vera ruddiligt til einhvørja tíð. Tá heingikoyggjan var pakkað, fylti hon ikki meira enn ein stórur koddi, hóast vit høvdu soviposa, madrassu, tvey løk, og ein vanligan kodda innan í.

Tann vaktin, sum tær fyrstu tvær vikurnar, hevði tríggjar feilfríar dagar í trekk, slapp undan at halda áfram at mynstra við heingikoyggjuna. Stutt eftir mynstraði ongin við koyggjuna longur.

Ein dagin vit koma oman á banjuna síggja vit, at allar heingikoyggurnar liggja á dúrkinum. Vanliga liggja tær í einum skápi. Vit síggja nú, at yvirstýrimaðurin og tveir kvartermeistarar kanna eftir, um tær enn vóru rætt pakkaðar saman. Allar vóru ikki feilfríar, og so mátti stakkals eigari mynstra einsamallur við heingikoyggjuna – í eina viku – hálvan tíma áðrenn øll onnur vóru purra út.

## Manningin taldi 97

Tá 97 ymisk fólk liva saman á einum sera avmarkaðum øki, so kann tað lættliga gerast trupult at finna fram til, hvør eigur hvat. Serliga tá øll ganga í eins eyðkennisbúna og svørtum hosum. So vit fingu boð um, at seyma okkara nummar í hvønn sokk, hvørja T-shirt, hvørt par av buksum og so framvegis. Eg var nr. 61, tað skrivaði eg enntá á mína tannbust.

Vit skuldu ikki lata okkara lutir liggja aðrastaðni enn í okkara privata skápi ella í okkara privata klædnabonki. Um ein yvirmaður fann okkurt, so stóð tað sjálvandi nummar í og tann næmingurin fekk so eitt „driftage-point“. Hvørt „point“ svaraði til 20 minuttir av arbeiðstíð.

Um tú hevði meira enn trý „point“, so skuldi tú arbeiða ein tíma eyka áðrenn tú fekst loyvi at fara í land.

## Ikki bara álvara

Ein dagin, eg stóð í mastrini og smurdi tjøru í dýrdar veðri, síggi eg, at yvirstýrimaðurin er farin at fylla luft í ein bjargingarflaka. Eg haldi hetta sjálvandi vera løgið, men hugsaði, at kanska leitar hann eftir einum holi í bjargingarflakanum. Tá flakin er uppblástur byrjar hann at fylla hann við vatni. Meðan eg eygleiði kemur Nadja, bátsmaðurin, yvir ímóti bjargingarflakanum. Men áðrenn hon veit av rendi yvirstýrimaðurin hana eftir høvdinum niður í bjargingarflakan, sum nú var fullur av vatni.

Soleiðis byrjaði vatnkríggið á túri nr. 100. Til kvøldvaktina, klokkan 18, møtti ongin í turrum klæðum.

## Stóra virðing fyri skiparanum

Skiparin var ein eldri maður við brillum. Hann var hvíthærdur og ikki av størstu monnum. Oftast var hann at síggja á dekkinum; í góðveðri var hann altíð í stuttum buksum. Mangan stóð hann við einum kaffikoppi í hondini og fylgdi við teimum 25 seglunum, hann flutti seg aftur og fram á dekkinum. Fekk skipið ein sjógv visti hann altíð – frammanundan – hvar hann skuldi standa.



*Hetta skapar orku. Tey sigla so væl sín fríða knørr.*

## Ein brotasjógvur

Fjórða hvønn dag hevði eg kvøldvakt frá 18 til 22. Tá skuldi dekkið skrubbast; tað bleiv gjørt við „maner“ – við sangi og dansi. Tá liðugt var at skrubba dekkið sluppu vit at vaska okkara egnu klæðir. Tey vóru vaskaði í sjógvi á dekkinum – við bust í hond løgu vit á knæ og skrubbaðu okkara klæðir. Ein dagin eg soleiðis liggi á knæ og vaski skolar ein alda bráddliga inn yvir meg. Eg fekk sjálvandi karm og øll míni klæði vóru nú dýggj vát. Tað sum eftir var av kvøldinum og næsta degnum var eg í gummistivlum, oljuklæðum og termoundirklæðum.

## Í bakandi sól á Asorunum

Tá skipið lág við bryggju stóð altíð ein vakt við landgongina. Vaktin var altíð í ullintum eyðkennisbúna; tað er sami búni, sum teir brúka á donsku verjuskipunum. Teir eru góðir í kulda norðanfyri, men ikki í góðveðri og bakandi sól sunnanfyri.

Ein dagin eg standi vakt við landgongina – í bakandi sól – leggi eg til merkis, at ein svartur SUV við litaðum rútum steðgar stutt frá skipinum. Úr bilinum koma tveir menn í litríkum skjúrtum yvir ímóti mær. Teir spyrja pent um teir kundu sleppa umborð at tosa við skiparan, „his danish cousin“, haldi eg tann eina siga.

Eg sendi boð til ein av stýrimonnunum, ið var staddur á dekkinum. Løtu seinni kemur skiparin og tekur væl ímóti gestunum. Á prátinum teirra millum skilji eg, at her var ikki talan um „his danish cousin“, men „his danish cosul“. Nú síggi eg eisini, at stýrimaðurin hyggur eitt sindur løgið yvir ímóti mær, men eg ypti øksl. Eg kendi ikki mannin!

## Vetrarklárt skip í Lissabon

Tá ið vit komu til Lissabon bleiv skipið lagt og skuldi gerast „vetrarklárt“. Hetta tók okkum 10 dagar. Eg var á seglvaktini, og tað innibar at taka øll tey 25 seglini – ella 1.800 fermetrar – niður, kanna hvønn seym, lappa har tað var neyðugt, og so at stúva í lastina. Tann 9. oktober 2013 fór seinasta helvtin av næmingunum – frá ferð 100 – av skipinum. Tað var við blandaðum kenslum, tá bussurin fór um hornið og skipið hvarv úr eygsjón.

Eg var nummar 61 – á ferð nummar 100 – og tað fari eg altíð at vera.



*Kongalig vitjan verður fyrireikað.*

## Kongalig vitjan

Tá skipið var fari út Keypmannahavn fóru vit ein stuttan túr inn á flotastøðina í Frederikshavn at bunkra. Ætlanin var ongantíð at liggja longri enn nakrar fáar tímar, men brádliga komu boð um, at prins Joakim, sum er protector av skipinum ætlaði sær á vitjan.

Nógv skal vera í lagi, tá so hábærslig vitjan er. Yvirstýrimaðurin rópti "all hands on deck" og so vóru vit sett til at pussa messing, skrubba dekk og at feska alt av. At trygdartiltøk vóru fyriskipað; løgdu vit skjótt til merkis. Vit sóu, at kavarar aðru hvørja løtu sóust í vatnskorpuni meðan teir leitaðu eftir spreingievnum, og skipið bleiv leita ígjøgnum frá innast til uttast.

Og sjálvandi, tá okkum minst tørvar tað, so koma teir størstu trupulleikarnir. Ein ventilur, ið var bundin til lortantangan byrjaði – ikki bara at dryppa, men – at spræna brúnt vatn útav bakkanum og sendi ein herviligan deym um alt skipið. So aftur at vaska og vóna at deymur hvarv aftur meðan allir tríggir maskinmeistararnir lógu niðri í einum holi og skrúvaðu meðan teir lósu illbønirnar upp. Trupulleikin tóktist at vera loystir, men yvirstýrimaðurin tordi ikki at taka nakrar tjans. Hann tók í tann fyrsta næmingin, ið kom framvið og setti hendan stakkals næming at halda vakt frammi á bakkanum, um nú ventilurin fór at gera um seg aftur, meðan vit høvdu vitjan.

Og sjálvandi endaði tað við, at eg kom at standa lorta-vaktina allan túrin frá Frederikshavn til Skagen, har prins Joakim bleiv sigldur inn við motorbátinum hjá okkum.

Prins Joakim kom til Frederikshavn við tyrlu, men kom á flotastøðina í einum stórum fylgi av svørtum bilum. Nú fingu vit forboð at taka myndir, tí verri. Seinni á túrinum fekk skiparin teldupost. Hann greiddi okkum frá til kvøld-mynstranina, at prins Joakim segði seg vera so væl nøgdan við túrin, at hann var farin í holt við at skaffa akkerspláss í Rio de Janeiro til Olympisku Leikirnar í 2016.

Nú veit eg, at akkersplássið er tryggja, so um onkur hevur hug at sleppa til OL 2016, so er at søkja um at sleppa við skúlaskipinum í 2016.

Tey, sum ynskja meira kunnleika um skúlaskipið kunnu fara á: **www. martec.nu/da/skoleskibet** ella á **facebook** síðuna hjá skipinum.

# Tá landsins lógir ikki vera hildnar hava vit anarki

Fyri at fáa myndugleikarnar at steðga ólógligu mynstringunum hevur felagið aftur og aftur gjørt vart við hesi lógarbrot

Ein partur av hesum var, at felagið 3. oktober 2014 sendi út tíðindaskriv, sum lutvíst bleiv endurgivið í miðlunum.

Tað má sigast at vera forkastiligt, at eitt fakfelag skal brúka so stóra orku fyri at fáa fútan og landsins leiðslu at steðga álvarsomum lógarbrotum

Við at vísa á tvey ítøkilig dømi, varð í tíðindaskrivinum gjørt greitt, at politi, VØRN og Sjóvinnustýrið passivt hava hugt at og tí gjørt tað møguligt hjá tveimum skipum at bróta ásetingarnar í manningarlógini um vinnubrøv og talið av maskinmeistarum.

Í seinasta enda snýr hetta seg um trygdina umborð á føroyskum skipum, og tað er sera álvarsamt.


Páll Hansen

## 8. apríl 2014

Longu 8. apríl 2014 boðaði Maskinmeistarafelagið politinum frá, at línuskipið Klakkur í Klaksvík ikki helt lógina um manning av skipum, tí maskinmeistararnir ikki høvdu lógarkravdu vinnubrøv og, at teir verri enn so høvdu teir førleikar, ið krevjast fyri at fáa hesi vinnubrøv.

Síðani hevur Maskinmeistarafelagið fleiri ferðir rykt politiið fyri at frætta, hvat gjørt verður við málið, men higartil hevur tað verið uttan úrslit.

## 5. september 2014

5. september gjørdi Maskinmeistarafelagið vart við, at línuskipið Eivind tá tríggjar ferðir hevur mynstrað við bert einum maskinmeistara, hóast manningarlógin ásetir, at skipið skal hava tveir – ein maskinstjóra og ein 1. meistara, tí maskinorkan er so mikið stór – og hetta stendur eisini í manningarskjalinum, ið Sjóvinnustýrið skrivaði út til skipið, tá tað kom í flotan tíðliga í vár.

Heldur ikki í hesum málinum tykist politiið at hava tikið nøkur serlig stig til at kanna og greiða málið. Í øllum førum fæst onki at vita um hetta, tá rykt verður eftir svari. Politigarðurin í Havn hevur treyðugt so svarað onkrum av rykkjarateldupostunum frá Maskinmeistarafelagnum.

## Úrslitaleyst samskifti

Í einum føri var bara ein tilvísing til eitt úrslitaleyst samskifti, sum politiið í Havn hevur havt við politistøðina í Miðvági, har Eivind mynstraði tveir av teimum trimum túrunum, og við Sjóvinnustýrið.

Sambært svarinum frá politistøðini í Havn bar ikki til at fáa nakað at vita av politistøðini í Miðvági, tí viðkomandi, ið hevði stemplað mynstringarlistarnar, tíðliga í summar fór frá við eftirløn, og úr Sjóvinnustýrinum fekk politiið bara at vita, at tey har arbeiddu við at taka yvir mynstringareftirlitið. Hetta heldur ikki, tí Sjóvinnustýrið hevur altíð haft mynstringareftirlitið!

## Slutur fyri ein slatur

Hatta er ein slutur fyri ein slatur. Vit hava meldað mynstringar hjá Klakki og tað er prógvfast, at manningarlógin er brotin. Mynstringarlistarnir eru stemplaðir og tøkir, og lógarásetingin er púra greið, eins og manningarskjølini hjá skipunum – í samsvari við manningarlógina – neyvt áseta minstukrøvini til manning og neyðugu vinnubrøvini hjá yvirmonnunum.

Tað eigur ikki at vera neyðugt hjá myndugleikunum við nøkrum drúgvum brævaskifti um tað, tí tað snýr seg einfalt um at kanna, um skipini framhaldandi ikki lúka krøvini í manningarlógini, og so steðga teimum, um tey ikki gera tað.

Klakkur bleiv í vár meldaður til politiið, tá Maskinmeistarafelagið staðfesti, at skipið var til fiskiskap uttan lógarkravdu manningina í maskinrúminum.

Viðvíkjandi Eivindi royndi Maskinmeistarafelagið eisini at fáa VØRN, ið hevur ábyrgdina av eftirlitinum á sjónum, og Sjóvinnustýrið, ið varðar av mynstringar- og manningarlóggávuni at traðka til. Hetta varð gjørt 5. september, sama dag sum málið eisini varð sent til politiið, men til fánýtis.

## 25 minuttir

Bara 25 minuttir eftir, at Maskinmeistarafelagið hevði sent VØRN teldupost við fyrispurningi um, hvat eftirlitsmyndugleikin kundi væntast at fara at gera við ólógligu mynstringarnar, svaraði Elmar Højgaard, stjóri í VØRN, at umrøddu mynstringarnar vóru framdar á politistøðini í Miðvági, og at VØRN tískil onki hevði við tær at gera.

Tá Maskinmeistarafelagið løtu seinni í nýggjum telduposti gjørdi vart við, at tað altso var Fiskiveiðieftirlitið hjá VØRN, sum hevði stemplað ta einu mynstringina, ið var farin fram í Kollafirði, svaraði Elmar Højgaard aftur, at tey skulu hyggja at hesi einu mynstringini. Men tá rykt varð eftir svari, boðaði VØRN frá, at málið nú bleiv viðgjørt í Sjóvinnustýrinum, sum eitt brot á mynstringarlóggávuna, og at nærri kunning um málið mátti fáast haðani.

## 12. september 2014

Sjóvinnustýrið svaraði Maskinmeistarafelagnum 12. september í einum telduposti, har sagt var, at stýrið fyrr í summar hevði staðfest brot á mynstringar- og manningarlóggávuna umborð á Eivindi, og at Sjóvinnustýrið ikki vildi gera nærri viðmerkingar í málinum, fyrr enn ein endalig avgerð var tikin.

Soleiðis verður málið blakað frá Peri til Pól, ongin tykist hava nakra ábyrgd, og skipini sigla framvegis. Vit hava meldað nakrar ítøkiligar mynstringar, men vit hava onga orsøk at halda, at hesi skipini allar aðrar túrar hava mynstrað eftir bókini ella bara av sær sjálvum hava fingið viðurskiftini í rættlag og eru farin at halda lógina. Tað kann vera, at myndugleikarnir ikki halda hetta vera so álvarsligt, men hetta snýr seg altso um trygdina umborð, bæði fyri skip og manning. Tað er eisini tað, sum teksturin í manningarskjalinum beinleiðis sigur.

Linda Hesselberg, senioranklager:

## ...beklage, at De ikke har modtaget et svar

Fríggjakvøldið 3. oktober 2014 fekk Maskinmeistarafelagið ein teldupost frá Lindu M. Hesselberg, senioranklager, við hesum boðum: **„Det kan oplyses, at sagen dags dato er sent til Vørn med anmodning om en udtalelse. Det kan oplyses, at det er almindelig praksis at høre særmyndigheden i sagen om overtrædelse af særlovgivningen. Afslutningssvis skal jeg beklage, at De ikke har modtaget et svar på Deres forespørgsel af 10. juli 2014 om sagen.“**

Hetta hálvforkølaða „beklager“ kemur eftir, at málið varð sent fútanum 8. apríl 2014.

Í hesum tíðarskeiðið hevur politiið, so at siga, onki gjørt við málið.

Viðvíkjandi okkara ætlan at senda málið víðari til politiovastan í Danmark er niðurstøðan tann, eftir at hava ráðført okkum við advokat felagsins, at tað einasta man fær burtur úr tí, er eitt beklager einaferð afturat, tí málið skal viðgerast í Føroyum.

Línuskipið Klakkur.



Hetta málið prógvar stóra líkasælu frá mynstringarmyndugleikanum. At man noyðist at provokera fyri at fáa svar frá fútanum er forkastiligt. Tað sær út, sum øll trý eftirlitini halda, at mynstringarlistar eru bert nakað, sum skal stemplast og síðan arkiverast. Ongin hyggur eftir ella eftirkannar mynstringarnar og harvið kann vandi vera fyri trygdini hjá skipinum.

# Ikki samsvar millum manningarskjalið og mynstringarlista

*Línuskipið Eivind.*




Hóast manningarskjalið hjá línuskipinum Eivind vísur, at maskinstøddin er 1.325 kW og tveir maskinistar skulu vera við skipinum, so stendur á mynstringarlistanum, at maskinstøddin er 749KW, her er ikki samsvar millum manningarskjalið og mynstringarlista.

Her er talan um meira enn eitt brot á manningarlógina, tí heldur ikki er upplýst um vinnubræv hjá tí maskinmeistaranum, sum er umborð ella hjá stýrimanni og kokki.

Sjóvinnustýrið hevur boðað frá, at tað viðgerð og fer at taka avgerð í málinum, men tað tykist at ganga sera striltið at fáa hetta avgreitt.

Maskinmeistarafelagið hevur tí nú boðað Sjóvinnustýrinum frá, at um tey ikki hava tikið avgerð í málinum innan 6 dagar, verður kæra send til landsstýrismannin og um neyðugt eisini til Løgtingsins Umboðsmann sum brot á vanligar fyrisitingarligar reglur um málsviðgerð av kærum.

## 14. oktober 2014

Týsdagin 14. oktober fekk Maskinmeistarafelagið eitt bræv frá Sjóvinnustýrinum. Hetta var sama dag, sum freistin hjá okkum gekk út fyri at fara víðari við málinum.

Í hesum brævi skrivar Sjóvinnustýrið, at tey hava boðað reiðaranum frá tann 30. september, at:

Fáa mynstringarviðurskiftini umborð á Eivind í rætt lag beinanvegin.

Á mynstringarlistanum skal reiðarin/skiparin upplýsa kw. smbrt. *§ 2 nr. 12* í manningarlógini, í samsvar við tey tøl, ið framganga av manningarskjalinum fyri Eivind XPQE.

Mynstringarlistin, ið reiðaríið skal brúka er tann mynstringarlistin, ið Sjóvinnustýrið vísir á skal brúkast á heimasíðu stovnsins *www.fma.fo*

## Mynstringarlistin skal verða rætt útfyltur

Hesi bæði dømi vísa greitt, at føroyska mynstringarskipanin ikki virkar. Skip skuldi ikki fingið loyvi at loyst frá bryggju, uttan at tað var komin ein fráboðan frá mynstringarmyndugleika, at mynstringarlistin var rætt útfyltur og at yvirmenninir høvdu sína útbúgving í ordan og tey vinnubrøv, sum vóru krøvd. Slík skipan er í okkara grannalondum og riggar sera væl.

# Lítið og einki skil á trygdarskeiðum og læknaváttanum

Sambært skrivi frá VØRN til Sjóvinnustýrið er lítið og einki skil á trygdarskeiðum og læknaváttanum



*Elmar Højgaard stjóri í VØRN.*

## VØRN skrivar soleiðis til Sjóvinnustýrið:

„Sjóvinnustýrið hevur ongantíð vilja viðurkent at hava eftirlitsuppgávuna viðvíkjandi mynstringum. Her hjá VØRN hava vit ongantíð verið í iva, at hettar er málsøkið hjá Sjóvinnustýrinum. Søgan er tann, at tá manningin á vaktarskipunum varnaðist, at lítið og einki skil var á trygdarskeiðum og læknaváttanum hjá manningini á føroyska fiskiskipunum, gjørdu vit vart við hettar yvirfyri Sjóvinnustýrinum."

## Fundir

„Vit høvdu fundir har Fiskimálaráðið eisini var umboðað, men Sjóvinnustýrið vildi ikki góðtaka, at eftirlitsuppgávan lág hjá teimum.

Tíverri hevði umboð fyri Fiskimálaráðið eisini somu støðu.

VØRN vildi ikki vera vitandi um, at ongin hevði áhuga í trygdini á sjónum, og tí bleiv av og á kannað eftir, hvussu støðan var við førleikakrøvunum hjá manningini á fiskiførum."

## Føroya Landfúti

„Varð komið fram á manglar í førleikakrøvunum, sum kravd eru tá mynstrað verður, vóru hesi mál send til Føroya Landfúta.

Føroya Landfúti hevur tó ikki gjørt nógv við hesi mál, men kortini so eru nøkur mál komin so mikið langt at dómur verður sagdur í næstum."

## Rudda upp

„VØRN hevur nú ruddað slóð fyri, at brot á mynstringarlóggávuna og manningarlógina verða viðgjørd hjá Føroya Landfúta, og vónandi eisini, at Føroya Rættur hevur ásett bótarupphædd.

Nú má tíðin verða komin, at Sjóvinnustýrið tekur ábyrgd av málsøkinum.

Vit kundu tikið ein fund um hesi viðurskifti í nærmastu framtíð, skrivar VØRN til Sjóvinnustýrið 24. februar 2014."

## VØRN fingið nøs frá løgmansskrivstovuni

Skrivið frá Løgmansskrivstovuni til VØRN er dagfest 21. august og er soljóðandi:

"Sjóvinnustýrið hevur ikki fyrr enn í hesu vikuni móttikið avrit av mynstringarlistum frá Vørn síðan skrivið 21. august. Tað vísir seg, at Vørn framvegis einans stemplar móttikið ovast á listan og ikki góðkennir niðast í høgra horni, sum vanligt var í 2013 og áðrenn tað. Á mynstringarlistanum (Skipsmanningarlistanum) er niðast í høgra horni ásett: **Tær í hesum manningarlista samtyktu hýrutreytir eru góðkendar fyri undirritaða mynstringarmyndugleika, og ein teigur til undirskrift mynstringarmyndugleikans."**

# Sjóvinnustýrið farið undir venjingar og gjørt samstarvsavtalu við VØRN og Arktisk Komando

Hetta er helst eitt úrslit av áhaldandi royndunum hjá Maskinmeistarafelagnum at fáa myndugleikarnar at halda føroyska lóggávu, men bøtur hetta um lógloysið ?



Hans Johannes á Brúgv stjóri í Sjóvinnustýrinum

Sambært samstarvsavtaluni millum Sjóvinnustýrið, Vørn og Arktisk Kommando fara eftirlitsfólkini hjá Vørn og Arktisk Kommando javnan umborð á føroysk fiskiskip at gera kanningar av trygdarviðurskiftum. Sjóvinnustýrið skrivar: Afturvendandi verður staðfest, at umstøðurnar í sambandi við viðlíkahald av trygdarútgerð kundu verið betri, og at kravið um mánaðarligar trygdarvenjingar ikki altíð verður fylgt. Tí hevur Sjóvinnustýrið gjørt av at gera átak umborð á føroyskum fiskiskipum yvir 24 metrar, har skipað verður fyri brandvenjing og venjing í sambandi við, at maður dettur fyri borð.

Endamálið við venjingunum er at royna trygdarmannagongdirnar sambært „brandrulluni", sum lýsir uppgávurnar hjá tí einstaka umborð undir neyðstøðu. Harafturat miðar venjingin seg eftir at tryggja, at manningin fær venjing í at brúka trygdarútgerðina, so sum neyðbrandpumpu, roykkavaraútgerð og aðra eldsløkkingarútgerð.

Í sambandi við venjingina kannar Sjóvinnustýrið eisini rýmingarleiðirnar umborð á skipinum, og um neyðljósini lýsa nøktandi, tá ið streymslit er, so at rýmingarleiðirnar síggjast hjá manningini.

Sjóvinnustýrið byrjaði átakið síðst í august 2014 og hevur higartil kannað fleiri fiskiskip. Ætlanin er at átakið skal halda fram í 2015.

Við hesum átakinum vónar Sjóvinnustýrið at hækka um tilbúgvingarstøðið umborð á fiskiskipum, og á tann hátt bøta um trygdina hjá føroyskum sjófólkum.

## Brot úr telduposti frá løgmansskrivstovuni 2. oktober 2014

Sjóvinnustýrið ásannar, at tey hava ábyrgd av lóggávuni viðvíkjandi mynstring, og hvussu eftirlitið við skipanini skal verða.

Sjóvinnustýrið arbeiðir við eini skipan at gera mynstringina on line hjá skiparanum. Ætlanin er at gera hana á slíkan hátt, at eftirkanningin við mynstringini í mestan mun er sjálvvirkandi.

Vinnumálaráðið arbeiðir við eini skipan, har ábyrgdin av eftirlitinum við mynstringum skiparans er greið hjá einum myndugleika burturav.

Vørn ásannar, at tey fram til dagin í dag hava havt ávísa ábyrgd á mynstringar økinum, og at tey fram til at nýggj skipan verður sett í verk framhaldandi arbeiða eftir skipanini, sum hon var áðrenn ársskiftið.

Vørn játtar, at Brimil og Tjaldrið sum áður taka stakroyndir av mynstringum fyri Sjóvinnufyrisitingina, tá ið tey annars fremja eftirlit umborð í øðrum sambandi,

Kunngerð nr. 2 frá 4. januar 1994 um mynstring hevur dagføringar fyri neyðini, og tekur Vinnumálaráðið stig til endurskoðan.




P/F Christian í Grótinum ynskir MIÐ & MAGN góðan byr

# Skerdur fuglur við lítlum flogi

**Tað verður ikki á míni vakt, at nakar sleppur gjøgnum nálareygað, uttan at galdandi lønar- og setanarviðurskifti eru í lagi. Tað hendir ikki!**



*Ken Nónklett leiðari á Útlendingastovuni.*

*Eftir Gunnar Skúvadal*

So avgjørdur er leiðarin á Útlendingastovuni, Ken Nónklett, ið er útbúgvin løgfrøðingur.

Hóast leiðarin hevur bestu intentiónir, so er tað rættuliga avmarkað hvørjar heimildir hann og hansara starvsfólk hava.

Útlendingastovan er í veruleikanum eitt ov ambitiøst navn, heldur Ken Nónklett. Tað ljóðar ov nógv av myndugleika. Og tað hevur Útlendingastovan ikki.

## Arbeiðsloyvi og familjusamanføring

Málið hjá einum útlendingi byrjar ofta í heimlandinum, men byrjar í ávísum førum hjá Politinum í Føroyum – um Politiið í Føroyum loyvir, at umsóknin verður innlatin har. Hagani fer tað til danska Udlændingestyrelsen, sum so brúkar Útlendingastovuna til at fáa eina meting.

Málini kunnu býtast upp í tvey: Arbeiðsloyvi og familjusamanføring.

Uppgávan hjá Útlendingastovuni, sum vanliga fær alt skjalatilfarið, er at tryggja, at galdandi sáttmálar og siðvenjur verða fylgd. Við øðrum orðum, at verja samfelagið ímóti „sosialari dumping“.

Útlendingastovan viðmælir ongantíð umsóknum, har arbeiðsgevarin bjóðar ov lítla løn.

Eftir hvat eg havi skilt hendi tað heldur ikki fyri mína tíð her, sigur Ken Nónklett.

## Regluliga er 10 – 15 ferðir

Útlendingar umborð á føroyskum skipum, sum fiska uttanfyri føroyskt sjóøki (12 fjórðingar úr landi), skulu sum meginregla ikki hava arbeiðs- og uppihaldsloyvi, uttan so, at skipið kemur „regluliga“ í føroyska havn. Udlædningestyrelsen hevur tulkað „regluliga“ at vera 10-15 ferðir.

Men er hetta ikki ein praksis, sum er trupul at umsita? Skuldi tað ikki verið eitt konsekvent krav um arbeiðs- og uppihaldsloyvi til allar útlendingar á sjógvi eins væl og á landi í Føroyum?

Eg haldi, tað átti at verið soleiðis, at útlendingar/reiðarar altíð søktu, ella, um ivamál eru, í minsta lagi sendu skrivligan fyrispurning til Udlændingestyrelsen, fyri at fáa greiðu á, um teir eru undantiknir kravinum um arbeiðs- og uppihaldsloyvi ella ikki. Við at senda ein skrivligan fyrispurning til Udlændingestyrelsen er møguligt at fáa svar, uttan at talan verður um eina veruliga málsviðgerð, sum tekur nakað longri tíð at avgreiða.

## Anitumálið

Tá Útlendingastovan hevur ein so avmarkaðan leiklut, sum hon í veruleikanum hevur, trokar spurningurin seg skjótt framat, hvussu aktuella støðan er umborð á føroyskum fiskiskipum, sum í størri ella minni mun brúka útlendska manning.

Ken Nónklett kann ikki úttala seg um seinasta ítøkiliga málið um fiskiskipið Anitu. Men hann minnir á, at manningin, sum var við bátinum, tá syndarliga vanlukkan hendi, øll bleiv útvíst, tá skipið kom inn. Og tað hevði neyvan hent, um málið hevði verið á borðinum hjá røttu myndugleikunum, harundir eisini Útlendingastovuni, og øll neyðug loyvi vóru fingin til vega.

## Arbeiðið er ikki meiningsleyst

Vit møta viðhvørt teirri fatan hjá fólki, at vit hava eftirlit við útlendingum í Føroyum. Men tað er púra skeivt. Vit vita enntá ikki, hvussu nógvir útlendingar eru í Føroyum. Eftirlitsskyldan liggur hjá politinum, so tað er har spurningarnir mugu setast.

Men vit hava ávirkan, tá ið eitt mál kemur á okkara borð. Men greitt er, at eru arbeiðsgevarar, ið taka útlendingar í starv uttan um lógarverkið, so hava vit ikki ávirkan. Tá er talan um mál fyri løgregluna.

Um málsøkið skuldi verið yvirtikið ella ikki er ein politiskur spurningur. Men leiðarin fyri Útlendingastovuna ávarar ímóti at undirmeta, hvussu komplekst útlendingaøkið í veruleikanum er. Hugsa bara um flóttarfólk og altjóða konventiónir, tað eru umfatandi mál, sum lætt kunnu skapa trupulleikar, meðan tað í dag bert eru hugtøk, sum føroyingar kunnu geva sær minni far um. Vit kundu skjótt átikið okkum eina størri ábyrgd, enn vit geva okkum far um, sigur Ken Nónklett.

## Leystlig samanteljing

Ein leystlig samanteljing, sum Útlendingastovan hevur gjørt fyri Mið & Magn vísir, at av teimum umleið 1.200 málunum um arbeiðsloyvi, sum eru komin til ummælis síðan 2009, hava 43 mál verið um fiskimenn. Tá eru umsóknirnar frá arbeiðsfólki til oljuboringarnar á landgrunninum ikki roknaðar uppí.

Ofta er talan um framleinging av áður givnum loyvum, og tá endar málsviðgerðin ofta við einum viðmæli, um so er at Útlendingastovan kann staðfesta, at røtt løn er útgoldin. Men tað kemur eisini meira enn so fyri, at málsviðgerðin endar við einum frámæli, eitt nú í 2009 og 2011, tá helvtin av øllum umsóknum endaðu við ikki at blíva viðmældar.

Spurdur um mest vanligu orsøkirnar til, at ein umsókn endar við einum frámæli, sigur Ken Nónklett, at um ein útlendingur longu er ólógliga í Føroyum er meginreglan, at umsókn um uppihaldsloyvi ikki kann viðgerast. Og um málið er illa upplýst er meginreglan, at umsóknin verður noktað.

Og sjálvandi verður eisini frámælt, um lønartilboðið frá arbeiðsgevaranum ikki er nøktandi, leggur Ken Nónklett afturat.

## Fylgja við almenna orðaskiftinum

Men hvussu tryggja tit tykkum, at tey tilmæli ella frámæli, sum tit hava givið Udlændingestyrelsen, hava nakað virði? Tit hava væl saktans ein natúrligan áhuga í, at tykkara arbeiði ger nyttu?

Tað ger tað. Tí hóast Útlendingastovan ikki kennir endaliga útfallið, so er tað okkara greiða fatan, at Udlændingestyrelsen í allarflestu førum leggur okkara útsagnir til grund í avgerðunum, tey taka.

Sjálvandi fylgja vit við í almenna orðaskiftinum um tey mál, sum nátúrliga hava okkara áhuga. Men í fyrstu syftu eru tað løgreglan og Udlændingestyrelsen, sum hava ábyrgdina, sigur Ken Nónklett.

Tá tit skulu viðmæla ella frámæla í einum máli, hvat brúka tit so til at stuðla tykkum upp í móti?

Í mun til útlendingar, sum søkja um arbeiðs- og uppihaldsloyvi, so verður hugt at, um viðurskiftini eru í samsvar við føroysk lønar- og setanarviðurskifti. Hetta er m.a. fyri at tryggja, at útlendskar manningar ikki fáa minni løn enn føroyskar manningar – fyri at sleppa undan sosialari dumping.

Tað verður so ikki á míni vakt, at vit í Føroyum fara at viðmæla nøkrum sum líkist sosialari dumping, sigur deildarleiðarin á Útlendingastovuni Ken Nónklett, at enda við Mið & Magn.

### Fakta – hagtøl:

**2009:** 7 umsóknir komnar í hoyring. Herav 4 viðmældar og 3 ikki viðmældar.

**2010:** 6 umsóknir komnar í hoyring. 3 framleingjanir ið vóru viðmældar. 1 nýggj umsókn ið var viðmæld og 2 ikki viðmældar.

**2011:** 12 umsóknir komnar í hoyring. 6 framleingjanir ið vóru viðmældar. 6 ikki viðmældar.

**2012:** 3 umsóknir komnar í hoyring. Allar framleingjanir ið vóru viðmældar.

**2013:** 7 umsóknir komnar í hoyring. Allar framleingjanir ið vóru viðmældar.

**2014:** 12 umsóknir komnar í hoyring higartil í ár. 9 framleingjanir ið vóru viðmældar. 3 nýggjar umsóknir ið vóru viðmældar. (Viðmerkjast kann, at av hesum 12 eru 4 sum ikki eru fiskimenn)

Viðmerkjast skal, at talan er um tøl, sum Útlendingastovan av sínum eintingum hevur gjørt til Mið & Magn. Tølini eru ikki formliga almenn og skulu tískil takast við einum ávísum fyrivarni.

### Hetta yvirlitið fevnir bara um fiskimenn

**2009:** 7 umsóknir komnar í hoyring. Herav 4 viðmældar og 3 ikki viðmældar.

**2010:** 6 umsóknir komnar í hoyring. 3 framleingjanir ið vóru viðmældar. 1 nýggj umsókn ið var viðmæld og 2 ikki viðmældar.

**2011:** 12 umsóknir komnar í hoyring. 6 framleingjanir ið vóru viðmældar. 6 ikki viðmældar.

**2012:** 3 umsóknir komnar í hoyring. Allar framleingjanir ið vóru viðmældar.

**2013:** 7 umsóknir komnar í hoyring. Allar framleingjanir ið vóru viðmældar.

**2014:** 12 umsóknir komnar í hoyring higartil í ár. 9 framleingjanir ið vóru viðmældar. 3 nýggjar umsóknir ið vóru viðmældar. (Viðmerkjast kann, at av hesum 12 eru 8 fiskimenn)

Viðmerkjast skal, at talan er um tøl, sum Útlendingastovan av sínum eintingum hevur gjørt til Mið & Magn. Tølini eru ikki formliga almenn og skulu tískil takast við einum ávísum fyrivarni.

BROT ÚR DAGBÓK



# Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum

| | | |
|---|---|---|
| 26-08-2004 | **Flutningsskip** | Beint áðrenn ólavsøku gjørdu manningarfeløgini avtalu við 5 reiðarí og reiðarísamtøk um flutningsskip í sambandi við makrel- og sildafiskiskap. Okkurt reiðarí var ikki við í fyrstu syftu. Ólavsøkuaftan bleiv sama avtala undirskrivað við reiðaríið hjá Asbjørn Senior. |
| 26-08-2014 | **MF Fundur í FMU** | Jan Højgaard greiddi í stuttum frá fundinum í Sofía, har ITF hevur havt kongress. Tosað varð um FOC-listan og hvussu man best sleppur av honum. Norra umhugsar at innføra NIS á norskum øki, og møguleiki er fyri at sviar fara at innføra tonnaguskatt eftir ríkisdagsvalið tann 14. september Hetta kann gera tað lættari at koma av FOC-listanum. |
| 28-08-2014 | **MF Nevndarfundur** | 9 mál vóru til støðutakan millum annað sáttmálaviðurskifti við skipini hjá Vørn, hettar er blivið eitt sera drúgt mál. Á skránni var eisini viðgerð av undantaksloyvum til maskinstjórar við fiskiskipum og útlendskir maskinmeistarar við føroyskum skipum. |
| 01-09-2014 | **FSN Fyrrapart** | Fundur í FMU um at gera CBA avtalu um manningina á Jupiter. Seinapart: Mið og Magn. Fyrsti blaðfundur eftir summarsteðgin, til umrøðu var innihaldið í komandi blaði, sum er nr. 22. |
| 03-09-2014 | **Sendistovan** | Fundur um at gera nýggja heimasíðu til NMF. Nú sekretariatið hjá NMF er hjá MF hava vit fingið hesa uppgávu. |
| 09-09-2014 | **Fíggjarmálaráðið** | Stuttur fundur við fíggjarmálaráðharran um at fáa sáttmálan fyri skipini hjá Vørn uppá pláss. |
| 10-09-2014 | **FSN Mið og Magn** | Blaðfundur um at fáa innihald til komandi blað endaliga uppá pláss. |
| 15-16-2014 | **Sekretariatsmøde í NMF** | Fundurin varð hildin í hølunum hjá Lederna í Stokholm. Fyrst framløgdu limalondini sínar rapportir. Nakað av kjaki var um mynstring við fiskiskipum, og um eftirlønarviðurskifti hjá fólki við fiskiskipum. Íslendingar vóru sera greiðir um mynstring av útlendskum sjófólki. Teir krevja sama cetifikat og hýru sum íslendingar; harumframt arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Íslandi. Aðrir spurningar vóru eisini uppi og vendu, millum annað ILO 188, ið er ein convention um hvíldartíð umborð á fiskiskipum. |
| 24-09-2014 | **LÍV og MF** | Fyrrapartin, fundur heima á høvuðsskrivstovuni hjá Liv: Har bleiv kunnað um gongdina seinasta árið inna eftirlønirnar viðurskifti hjá limunum, samstundis bleiv kunna um samlagstrygg-ingina, samanumtikið sær tað bara gott út, men innan hættuligar sjúkur síggja vit tí verri eina øking. Seinnapartin; nevndarfundur: Seks mál vóru til kunningar millum annað kunning um NMF fundin í Stokholm, og nýggju avtaluna fyri skipini hjá Vørn. Fimm mál vóru til støðutakan, millum annað uppsøgn av sáttmálum við Føroya reiðarafelag fyri fiskiskip, nevndin samtykti at siga hendan sáttmálan upp, eisini bleiv tosað um mynstringar óskil, felagið hevur sent tvær kærur til mynstringar myndug leikarnar í ár uttan at tað hendur nakað. |
| 02-10-2014 | **ALS-húsið** | Fundur í Trygdargrunninum har kunnað varð um tað, sum er færri av hesum árinum. Støðan er góð, inntøkurnar nakað minni enn árið í fjør, tó í snitt, sum eitt miðal ár. |



*Í september 2014 var NMF fundur í Stockholm*

***Fundarluttakarar frá vinstru:***
*Halldór Arnar Guðmundsson, Ísland - Guðmundur Ragnarsson, Ísland - Sami Uolamo, Finland - Páll Hansen, Føroyar - Gustav Schmidt Hansen, Danmark - Odd Rune Malterud, Noreg - Mikael Huss, Svøríki - Sjúrður Heinesen, Føroyar - Per Jørgensen, Danmark - Leif Wikstrøm, Finland.*

Nordiska Maskinbefälsfederationen

## Arbeidsmengde – utmattelse og bemanning

Nedsatt ytelse som følge av stor arbeidsmengde og utmattelse er et utbredt problem innenfor maritim og fiskerisektoren som resulterer i ulykker, truer liv, sikkerhet og vern av det marine miljø.

Bemanningen blir ofte satt urealistisk lav av nasjonale myndigheter for å tiltrekke seg rederier til deres register for å få et konkurransefortrinn.

IMO har tatt fatt i problemstillingen med underbemannede skip gjennom IMO resolusjon A.1047 (27) „Principles of Minimum Safe Manning“ „som tredde i kraft 1. januar 2014, hvor hensyn til de faktiske driftsforhold om bord i et bestemt skip tas hensyn til – både i sjø og havn.

Endring av SOLAS kapittel V, forordning V / 14 krever at nasjonale myndigheter skal saksbehandle bemanningen etter en gjennomsiktig prosedyre.

Sammen med MLC 2006 og det faktum at skipsledelsen om bord er kjent med sitt ansvar burde da alle skip nå være behørig bemannet med kvalifisert personell.

NMF anser det nye regelverket som essensielt viktig for den enkeltes sikkerhet og krever at samtlige skal formidle denne kunnskap til alle berørte parter for å kunne øke sikkerheten og verne om arbeidsmiljøet ombord.

### 2012 May SOLAS amendments

The SOLAS amendments which entered into force on 1 January 2014 include the following:

– amendment to SOLAS chapter V to add a new regulation V/14 on ships' manning, to require Administrations, for every ship, to establish appropriate minimum safe manning levels following a transparent procedure, taking into account the guidance adopted by IMO (Assembly resolution A.1047(27) on Principles of minimum safe manning); and issue an appropriate minimum safe manning document or equivalent as evidence of the minimum safe manning considered necessary–

*Stockholm den 16. September 2014*
*Nordiska Maskinbefälsfederationen*

***Páll Hansen, præsident***



# Tíðindi frá Skipara- og Navigatørfelagnum:

**23-07-2014 Fiskimálaráðið**
Fiskivinnuráðið ummælir tvey uppskot, annað um at loyva veiðu eftir upsa við skiljirist á økjum, sum eru stongd fyri trolveiðu. Hitt uppskotið var um tíðaravmarkaða royndarveiðu við línu og snellu á Føroya Banka. Ráðið tók undir við báðum uppskotinum.

**24, 25-07-2014 Fiskimannafelagið**
Samráðingar millum manningarfeløgini og eigarar av nótaskipum og partrolarum um, hvussu býtast skal millum skipini, sum fiska og tað skipið, sum førir fiskin til lands. Partrolar eru ikki væl egnaðir til at føra sild og makrel til lands at virka. Semja varð gjørd um, at flutningsskip skulu fáa 40 % av veiðuni. Nakrar serreglur vóru gjørdar fyri skip við ongum veiðiloyvi og tey, sum avrokna eftir ídnaðarsáttmálanum.

**25-07-2014 Fiskimálaráðið**
Fiskivinnuráðið verður innkallað í skundi at umrøða eina átrokandi tekniska broyting í makrelkunngerðini fyri 2014.

**28-07-2014 Fiskimannafelagið**
Avtala verður undirskrivað við reiðaríið hjá Asbjørn Senior og Grunnabarði um, at reiðarí skal virða galdandi sáttmála. Lýsta mynstringarbannið verður avblást.

**01-09-2014 Maskinmeistarafelagið**
Fundur við Faroe Marine Services um sáttmála fyri útlendska manning umborð á einum skipi, sum teir hava Bare-boat chartra undir FAS. Her er talan um eitt havrannsóknarskip, sum indar eiga við russiskari manning. Manningin verður lønt samsvarandi ITF sáttmála.

**01-09-2014 FSN**
Nevndin viðger ymisk innanhýsis mál

**03 til 05-09-2014 Ísafjørður, Ísland**
Annfinnur Garðalíð og Elias Zachariassen umboða FSN á Norðurlendsku Navigatørkongressini. Nýggja MLC lóggávan fekk nógva umrøðu.

**11-09-2014 Fiskimálaráðið**
Fiskivinnuráðið er innkallað til at viðgera uppskot um broyting í kunngerð, sum skal regulera fiskiskapin av okkara botnfiskakvotu í Grønlandi. Dagurin har landsstýrismaðurin kann lata øðrum kvotuna verður fluttur ein hálvan mánað fram.

**12-09-2014 FSN**
Nevndarfundur til at viðgera ymisk innanhýsis mál og komandi sáttmálasamráðingar fyri fiskiskip og ásetan av komandi aðalfundi.

**24-09-2014 Lívstrygging**
Kunnað varð um gongdina í okkara samlagstrygging. Skaðagongdin hevur verið positiv, nógv færri deyðsføll og hættisligar sjúkur hava verið millum limirnar. Tíverri eru tað framvegis nógvir, sum ikki gjalda inn fyri trygginga.

**02-10-2014 ALS**
Stýrisfundur í Trygdargrunninum, verkætlanin við nýggjari KT skipan gongur eftir ætlan. Sum heild verður ikki nógv goldið út í minstuløn fyri tíðina.

**07-10-2014 Dómhúsið**
Eitt mál millum FSN og eitt reiðarí um limagjøld og samlagstryggingargjøld, sum ikki eru goldin verður tikið upp til dóms. FSN hevur ført fram at reiðarin hevur skyldu at eftirhalda hesi gjøld sambært sáttmálanum. Reiðarin hevur ført fram, at hann ikki er limur í Reiðarafelagnum og tískil ikki er bundin av hesi áseting.

**30-10-2014 Vinnuháskúlin**
Fundur í Maritima útbúgvingarráðnum, evni er aspirantskipanin.

# Nú nærkast til aðalfundin




*Mynd frá aðalfundinum í 2013.*

Tann 29. desember 2014 verður aðalfundurin hjá FSN hildin á Hotel Føroyum. Tað hevur verið siðvenja í mong ár at hava fundin millum jól og nýggjár. Hetta kemst av, at tá eru flestir av limum okkara heima. Viðtøkurnar siga at fundurin skal haldast í desember ella januar.

Vanliga møtir heilt fitt av limum á aðalfundi, og gott og gevandi orðaskifti er á fundinum. Nógv ymisk sjónarmið koma fram, og tað eru ikki bert rósandi orð um tað, sum nevnd og leiðsla hava avrikað. Hetta er ein umráðandi partur av menningini av felagnum, og er við til at halda okkum á rættari kós. Bæði virknir og hvílandi limir kunnu luttaka á fundinum.

Hesaferð standa 6 nevndarlimir fyri vali, 4 av teimum hava longu nú boðað frá, at teir ikki ynskja afturval. Orsøkirnar fyri hesum eru ymiskar millum annað, at teir ikki longur starvast á okkara sáttmálaøki. Um onkur ynskir at senda brævatkvøðu til nevndarvalið, so kann hetta gerast við at venda sær til skrivstovuna á *fsn@fsn.fo* ella á *316973*

Sáttmálin fyri fiskiskip er uppsagdur til at fara úr gildi við ársskiftið, sáttmálin fyri farma- og frálandaskip kann sigast upp til 1. mars 2015. So her er heilt greitt nógv at tosa um, og vit vænta væl av fólki til fundin.

**Aðalfundurin 2014 verður hildin mánadagin 29 desember kl. 12.00 á Hotel Føroyum, innbjóðing verður send øllum limum.**

## Maskinmeistarafelagið

| | | |
|---|---|---|
| Niels Pauli Holm | 06-10-1944 | 70 ár |
| Theodor Wilhelmsen | 19-10-1944 | 70 ár |
| Annfinn Hentze | 18-12-1944 | 70 ár |
| Harald Nattestad | 04-10-1954 | 60 ár |
| Álvur Næs Berg | 09-10-1954 | 60 ár |
| Stig Nielsen | 11-10-1954 | 60 ár |
| Jóannes Christiansen | 28-10-1954 | 60 ár |
| Martin J. Dam | 25-12-1954 | 60 ár |
| Martin Hansen | 25-12-1954 | 60 ár |
| Johnny Múller Jacobsen | 21-10-1964 | 50 ár |
| Sæbjørn B. Nielsen | 31-10-1964 | 50 ár |
| Beinir Joensen | 03-11-1964 | 50 ár |
| Páll Olsen | 02-12-1964 | 50 ár |
| Ásbjørn Petersen | 09-12-1964 | 50 ár |
| Niklas Jacksson Højgaard | 27-12-1964 | 50 ár |
| Knút Olsen | 16-09-1984 | 30 ár |
| Jóhan á Lakjuni | 22-10-1984 | 30 ár |
| Tummas Eli Bjartalíð | 31-10-1984 | 30 ár |

## Skipara- og Navigatørfelagið

| | | |
|---|---|---|
| Amaliel Knudsen | 04-09-1934 | 80 ár |
| Erling Eliasen | 13-09-1934 | 80 ár |
| Páll B. Weihe | 09-11-1944 | 70 ár |
| Eyðun Johannesen | 28-11-1944 | 70 ár |
| Herman Olsen | 05-12-1944 | 70 ár |
| Eivind Haraldsen | 06-09-1954 | 60 ár |
| Birgir Thomsen | 08-09-1954 | 60 ár |
| Kári Petersen | 12-09-1954 | 60 ár |
| Mainhard T. Eliasen | 20-09-1954 | 60 ár |
| Harry Ellefsen | 29-09-1954 | 60 ár |
| Erling Leonsson | 13-10-1954 | 60 ár |
| Niclas Joensen | 15-10-1954 | 60 ár |
| Poul Jacobsen | 22-10-1954 | 60 ár |
| Olaf Theodor Kruse | 24-10-1954 | 60 ár |
| Jóanis Christiansen | 28-10-1954 | 60 ár |
| Tórhallur Gaardbo | 06-11-1954 | 60 ár |
| Símun P. Sivertsen | 18-11-1954 | 60 ár |
| Kristian Ludvig Samuelsen | 01-12-1954 | 60 ár |
| Per Nielsen Knudsen | 01-09-1964 | 50 ár |
| Sunnleif Fagradal | 09-09-1964 | 50 ár |
| Magni Bertholdsen | 12-09-1964 | 50 ár |
| Páll Johan Poulsen | 07-10-1964 | 50 ár |
| Sverri Kjærbæk | 10-10-1964 | 50 ár |
| Kim Høgni Johannesen | 29-10-1964 | 50 ár |
| Jóhan Petur Suni Olsen | 06-12-1964 | 50 ár |
| Eyvindur Suni Jacobsen | 10-12-1964 | 50 ár |
| Jónhard Petersen | 10-10-1974 | 40 ár |
| Pauli Johannesen | 02-11-1974 | 40 ár |
| Eyðstein Sørensen | 04-11-1974 | 40 ár |
| Bergar Hvannastein | 03-12-1974 | 40 ár |
| Jógvan Hvidbro | 06-09-1984 | 30 ár |
| Jørgin Joensen | 11-09-1984 | 30 ár |
| Árni Stenberg | 30-10-1984 | 30 ár |






# Hallur Mohr



***Føddur 1. august 1955***

**Maki:**
Giftur við Ester Mohr, sum er heilsuhjálpari.

**Børn:**
Súsanna 41, Rúni 35, Henry 33, Kitty 25 og Sámuel 16 ár.

**Starv:**
Skipari á Ternuni hjá Strandfaraskip Landsins, sum siglir ímillum Havnina og Nólsoy.

**Útbúgving:**
Eftir 7. flokk valdi eg at fara til skips, eg veit ikki, hvør var troyttur av skúlabonkinum eg, ella kanska hann av MÆR. Tók skipsførara prógv á sumri 1979

**Hvussu eru útlitini hjá Navigatørum?**
Tað er nógv broytt fyri sjómannin tey síðstu árini, hyggja vit nøkur ár aftur í tíðina var vanligt at fara við fiskiskipi eftir lokna útbúgving. Tann minni parturin fór út at sigla. Í dag er tað øvugt frálandavinnan og aðrar vinnur hava tikið plássið frá fiskivinnuni, tað eru eisini nógv størri møguleikar í dag hjá navigatørinum at finna sær arbeiði uttan fyri landoddarnar.

**Hvat er størsta avbjóðingin hjá einum Skipara í dag?**
Tað at hava ábyrgdina umborð er ein stór avbjóðing, syrgja fyri at trygdin altíð er í hásæti. Tað koma bara fleiri og fleiri altjóða krøv á okkum, sum vit muga seta okkum inn í. Og meira og meira av pappírarbeiði er umborð, so tann stóri parturin av arbeiðinum umborð í dag, gongur fyri seg á telduni.

**Fyrstu ferð til skips:**
Fyrsti túrurin var við línugarnabátinum Norðbúgvanum í 1970.

**Hvørjum skipum hevur tú verið við:**
Fyrstu 2 árini við Norðbúgvanum, so 8 ár við Sólborg og Krúnborg hjá Eiler Jacobsen, 7 ár við ísfiskatrolarnum Dragaberg. So gekk leiðin út at sigla, har var eg í 7 ár hjá KIL. So flaggaði alt út har, og síðstu 3 árini hjá T&C í Svendborgm, sum yvirtóku 3 skip frá KIL

Tá gavst eg at sigla úti, ynskti drongurin hjá okkum bleiv sjúkur. Eg mátti finna mær arbeiði heima, og byrjaði so hjá Strandfaraskip Landsins á sumri 2001.

**Longsti túrur til skips:**
Fóru til Vestur Grønland við Norbúgvanum síðst í august 1970, komu heim aftur í seinnu helvt av februar - árið eftir, lógu eitt lítið døgn á Havnini (eg sum kom frá Fuglafirði slapp ikki til hús) og so undir Føroyar i u.l. 2 mánar, 450 tons av saltfiski og 120 av frystum, í tilsamans góðar 7 mánar var fongurin.

**Frítíðarítriv:**
Mest av frítíðini fer saman við konuni og abbabørnunum. Má kanska siga at ítrótturin ikki fyllur nógv hjá mær, gangi nógv úti í náttúruni, og eri nokk so nógv úti í fjørðinum, fari onkran túrin við súkkluni eisini, annars dámar mær sera væl tónleik, so har brúki eg nógvar løtur til at spæla og lurta eftir tónleiki.

**Bilur:**
Svartur Citroen 4.

**Telda:**
Fujitsu Siemens.

**Besta bók:**
Bøkur eru nógvar góðar, ein tann stuttligasta er Feðgar á Ferð hjá Heðin Brú.

**Besti sangur:**
Teir eru nakrir, í yngri árum dámdi mær væl Bee Gees t.d við How deep is your love, og nú er tað skift yvir til Gospel, kanska Carrie Underwood við How great thou Art.

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum:**
At vakna upp hvønn morgun og kunna fara til arbeiðis, at familjan hevur tað gott, og ikki at gloyma, at vit búgva í einum so ríkt vælsignaðum landi, og kunna kalla okkum ein trúgvandi tjóð.

**Hvat kann øsa teg í dagligdegnum:**
Tá fólk grenja bara fyri at grenja.

**Um skiparan og maskinmeistaran:**
Trúgvi til felags á flest øllum skipum, verður tað skotið við leysakrúti av og á ímillum brúnna og maskinina.




# Tín eftirløn tryggjar tær eitt virðiligt LÍV

Hóast tú í gerandisdegnum ikki hugsar um eftirløn og tryggingar, so hevur hetta stóran týdning fyri teg.

Rætta eftirlønarskipanin, trygging við óarbeiðsføri og ein lívstrygging léttir tær um tilveruna, tá tú leggur frá tær, tryggjar tær eitt virðiligt lív, um tú missir førleikan, og tryggjar tey, ið sita eftir, um tú leggur árarnar inn ov tíðliga.

LÍV er Føroya elsta og størsta eftirlønar- og lívstryggingarfelag við yvir 22.000 eftirlønaravtalum. Við einum starvsfólkaliði við drúgvum royndum og hægstu útbúgvingum og serfrøði á økinum tryggja vit kundum okkara eina trygga eftirløn og munagóðar tryggingar í einum samhaldsføstum felagi.

Samstundis ger støddin okkum før fyri at umsita íløgurnar uttan dýrkandi millumlið. Hetta gevur hægri avkast og lægri umsitingargjøld.

– Trygg eftirløn

ekko.fo

# Oljuvinnan í eini rembingartíð

Meðan oljuprísurin lækkar í heyst koma hópuppsagnir í oljuvinnuni. Bara í norsku oljuvinnuni eru tøl sum 13. - 14.000 uppsagnir nevnd. Men hvat er tað, sum hendir í oljuídnaðinum?

Í fyrsta umfari kunnu vit siga, at fyri vanliga brúkarin er tað sjálvandi gott at oljuprísurin lækkar. Men hetta er ikki allur sannleikin; tí samstundis rakar ein kreppa londini, sum hava stóra dýra oljuframleiðslu. Og tá er talan um okkara grannalond; serliga Norra verður hært rakt, har stórt tal av føroyingum hava havt góðar arbeiðsgevarar. Men føroyingar, sum arbeiða í oljuvinnuni í øðrum londum verða eisini raktir.

## West Hercules úr Føroyum til Kanada

Tá West Hercules stevndi inn á Skálafjørðin, so varð hetta av føroyingum mett, sum eitt risastig fyri at fáa meir virksemi atknýtt oljuvinnuni í Føroyum. Men samstundis vóru oljupallar lagdir, og hetta skapti stóra óvissu í norska oljuídnaðinum. West Hercules kom rættuliga í brennidepilin, tá tað frættist, at hann var sendur til kanadiskan sjógv og, at ein heil vakt á boripallinum misti arbeiði.

Álitismaðurin hjá norska fakfelagssamstarvinum DSO, Sigurd Karlsen, ið sjálvur arbeiðir umborð á West Hercules, sigur at støðan var sera trupul og krevjandi. Serliga millum starvsfólkini, sum høvdu drúgvar royndir – og eru komin nakað til árs – var spurningurin um tey skuldu siga nei takk til at fara til Kanada. Tað sum vigaði tungt var, at tey fingu at vita, at m.a. lønarviðurskiftini fóru at vera vánaligari. Hinvegin kundu tey fara til Kanada og vóna at tey sleppa aftur í norskan sjógv um tvey ár fyri eina betur løn. Søgdu tey nei var ikki vist, at tey fáa arbeiða á øðrum boripallum í norskum sjógvi.

Greinarar siga, at talan er heldur um eina røð av hendingum, sum til samans gera, at stórir trupulleikar eru í oljuvinnuni. Hetta merkir m.a. at roknast kann við, at nógvar fyritøkur, sum eru knýttar at oljuvinnuni fara á húsagang.

## Hvussu lágan prís tola oljulondini?

Oljulond sum Noreg og Saudi-Arabia tola at prísurin lækkar, tí tey hava stórar oljugrunnar, sum tey kunnu brúka um neyðugt er at tryggja egnum búskap.

Alex Russel, ið er professari á Aberdeen Business School, sigur á sínum bloggi, at fleiri oljulond mugu hava minst 90, ella helst 100 dollarar fyri fatið fyri, at javnvág skal vera í búskapinum og á fíggjarlógini. Russel peikar á, at Russland, Iran, Venesuela og Libya eru komin illa fyri av lága oljuprísinum. Hann vísir serliga á Russland, tí teir hollastu stuðlarnir hjá Vladimir Putin eru eigarar í oljufeløgum, og hesir eru hart raktir av lækkandi oljuprísi. Fyri hesi londini er prísurin í dag, sum er millum 80 og 90 dollarar fatið, ov lágur.

## Aðrar keldur

Oljugreinarin hjá Nordea Markets, Thina Saltvedt, sigur í samrøðu við Nettavisen, at Saudi-Arabia hevur boðað frá, at landið kann liva við einum oljuprísi, sum liggur um 80 dollarar komandi tvey árini.

Ole Gunnar Austvik, ið er professari og granskari á uttanríkispolitiska stovninum NUPI í Oslo, sigur við Nettavisen, at meðan Saudi-Arabia kann liva við einum lágum oljuprísi, so kann USA ikki tað, tí skiferoljan er dýr og ikki kappingarfør, tá prísurin lækkar. Metingar siga, at oljuprísurin má vera omanfyri 90 dollarar fatið um londini skulu vera kappingarfør. Men Saudi-Arabia kann brúka lága prísin til at tryggja sær sjálvum marknaðin.

## Dýrari ætlanir til síðis

Oljuprísurin er fallin í stórum síðani í summar; tað eru ikki nógvir mánaðir síðani, at oljuprísurin lá millum 110 og 115 dollarar fyri eitt fat av olju. Um hálvan oktober var prísurin á norðsjóvarolju niðanfyri 83 dollarar, meðan tann amerikanska ráoljan kostar niðanfyri 80 dollarar fatið.

Tann lækkandi oljuprísurin ger, at oljufeløgini eru meira varin og leggja dýrari ætlanir til síðis, og brúka orku har tey, longu hava olju ella har tað er lættari at sleppa framat oljuni. Roknast kann eisini við, at stórar sparingar verða settar í verk í flestu londum, sum framleiða olju.

## Føroyar verða eisini raktar

Men rembingarnar í oljuídnaðinum raka eisini Føroyar beinleiðis, tí fyri tað fyrsta gerst truplari at fáa vællønt størv í oljuídnaðinum nú, og tey, sum arbeiða í oljuídnaðinum hava ótryggari størv. Uppsagnir eru komnar, og fleiri fara at koma. Í Noregi sigur man, at fyri hvønn oljuarbeiðara á boripalli, sum verður arbeiðsleysur, missa samstundis 5 fólk á landi arbeiðið. Tað merkir, at tá Statoil boðar frá, at tey fara at siga knappliga 2.000 fólkum úr starvi, so merkir tað, at 9. - 10.000 onnur størv hvørva.

Og at enda kunnu vit siga, at føroyska undirgrundin nú er vorðin minni áhugaverd. Neyvan nakað av oljufeløgunum fara undir leiting eftir olju í føroysku undirgrundini sum støðan er í løtuni.




**Oljuprísurin í US dollarum seinasta árið.**

### Oljugreinarin Torbjørn Kjus setur fokus á 8 viðurskifti:

Oljugreinarin Torbjørn Kjus hjá DNB Markets, sigur við Mið og Magn, at tey 8 punktini hann legði fram fyrr í heyst, og sum eru endurgivin í miðlum í fleiri londum, framvegis eru galdandi.

**Við teimum 8 punktunum niðanfyri lýsir hann hvat, ið er avgerandi í kreppuni, vit í dag síggja í oljuvinnuni:**

1. **Framleiðsluvøkstur:** Millum annað øgiligur vøkstur í framleiðslu av skiferolju úr USA.
2. **Eftirspurningurin minkaður:** Minni vøkstur í heimsbúskapinum ger at tørvurin á olju minkar.
3. **Aðrar orkukeldur:** Fleiri lond leggja orkunýtsluna um til grøna orku, serliga tá oljuprísurin er høgur.
4. **Libya:** Hóast landið er í kríggj, so er framleiðslan økt úr 240.000 føtum av olju um dagin til 900.000 føt.
5. **Irak:** Islamski Staturin (IS) hevur økt munandi um framleiðsluna av olju í teimum pørtunum av Irak har teir sita við ræði. Irak framleiðir í dag 3,3 milliónir føt av „oljulíkum" (frágreiðing niðanfyri) – tað eru 500.000 føt fleiri enn um somu tíð í 2013.
6. **Vesturafrika:** USA keypti í mong ár olju úr Vesturafrika, men nú USA framleiðir skiferolju hevur landið ikki longur brúk fyri olju úr Vesturafrika. Oljan úr Vesturafrika kemur tí til Evropa og Asia, og trýstir prísirnar á hesum marknaðunum.
7. **Oljugoymslurnar:** At oljuframleiðslan økist samstundis sum minni verður selt av olju ger, at oljugoymslurnar eru størri enn tær hava verið í nógv ár.
8. **OPEC:** Fyribils lata oljuframleiðandi londini prísin lækka. Spurningurin er nær lond sum Saudi-Arabia siga, at nú er nokk, og gera nakað við at avmarka framleiðsluna fyri at royna at fáa prísin uppaftur.

Á omanfyrinevnda lista hevur Torbjørn Kjus ikki nevnt kreppuna millum Vesturheimin og Russland. Við Mið og Magn sigur hann, at tann kreppan ikki rakar oljuídnaðin. Kreppan við Russland hevur mest at siga fyri gassmarknaðin, og ikki oljumarknaðin, sigur hann.

Longu í 2012 spáddi Torbjørn Kjus, at oljuprísurin fór at lækka, og hóast hann ikki fekk undirtøku, so vísir gongdin at hann hevði rætt.

20. oktober 2014 hevði felagið hjá norskum búskapargreinarum fund um støðuna í oljuvinnuni. Tá segði Kjus: Eg komi skjótt við eini nýggjari meting av oljuprísinum í 2015, og teir fara at liggja ímillum 70 og 90 dollarar fatið, segði hann, og legði afturat at støðið á oljuprísinum í dag kemur at halda sær eina tíð.

Hvat merkir orðið „oljulíkar": *Oljulíkar er tað sum á norskum eitur oljeekvavalenter – tað er tann eindin, sum verður brúkt har olja og gass er umroknað til sama virði.*



*Torbjørn Kjus oljugreinari*

Tað er eitt, sum føroyskir politikarar og heldur ikki fiskivinnan enn hava fatað, og tað er, at ein sterkur fiskastovnur er munandi meira sterkur móti sveiggjum í náttúruni enn ein veikur og niðurfiskaður fiskastovnur. Ein stovnur, sum ikki verður troyttur burðardygt, klárar seg bert tey allarbestu árini, tá ið alt gongur eftir vild og gevur einki tey vánaligu árini.

# Sterkir stovnar klára ringar tíðir

*Eftir Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Hetta er supputerningurin ella essensurin av samrøðu yvirritaði hevði við 50 ára gamla fiskifrøðingin og glyvramannin Petur Steingrund, sum húsast á Skála, tá ið hann ikki vassar í skjølum á Havstovuni og flytur seg tumma fyri tumma fram innan gransking av fiskasløgum undir Føroyum.

## Nebbasildin og uppisjóvafiskur

Journalistar fáa ikki altíð tað teir fara eftir. Eg havi sæð nebbasild við strendurnar í summar og hoyrt menn tosað um hetta, og tað skuldi boðað frá framgongd á sjónum og betri fiskiskap. Eg havi eisini lurtað eftir royndum monnum, sum siga, at er nógvur uppisjóvafiskur, tá hava botnfiskastovnarnir tað ikki gott, tí uppisjóvafiskurin etur botnfiskayngul. Men hendan greinin fór ikki at handla um tað í høvuðsheitinum.

Tað er sjálvsagt ein ávísur samanhangur millum – um nógvur uppisjóvafiskur er – og støðuna hjá botnfiskastovnunum. Og hevur tú nógv av botnfiski frammanundan, tá klárar hann seg betri og ávirkanin er minni. At meira av nebbasild er at síggja, at nebbasildastovnurin er í menning, er sjálvsagt gott, men nebbasildin einsamøll bjargar ikki søguligt lágu hýsu og toskastovnunum undir Føroyum í hesum døgum. Undan krígnum var toskastovnurin eini 80.0000 tons undir Føroyum. Eftir kríggið var hann komin upp á 150.000 tons. Eftir kríggið var nógvur toskur og nógv sild samstundis, og tá riggaði tað fínt. Um toskastovnurin og hýsustovnurin eru nóg sterkir, tá ávirkar uppisjóvafiskurin ikki stórvegis. Eru teir hinvegin veikir, tá ávirkar nógvur uppisjóvafiskur meira.

## Altíð verið uppisjóvafiskur

Petur Steingrund vísir á, at uppisjóvafiskur er ikki nakað nýtt undir Føroyum. Hann hevur altíð verið. Uppisjóvafiskur kemur her at leita eftir mati. Fram til sekstiárini í farnu øld gýtti tann várgýtandi norðhavssildin á Sandoyarbankanum í februar og mars og síðan hvarv hon. Vit bíða framvegis eftir, at hon aftur fer at gýta undir Føroyum.

– Hetta at hava nógvan uppisjóvafisk undir Føroyum er sum sagt ikki nakað nýtt, men at hann skal eta toska og hýsuyngul, tað vísa okkara kanningar ikki. Vit hava ikki funnið toskalarvur í makrelmagum undir okkara kanningum.



*Petur Steingrund fiskifrøðingur*

## Várgýtandi sildin og makrelur – sjógvurin er nógv heitari nú

– Tá ið várgýtandi sildin gýtti undir Føroyum, høvdu vit sild, sum er ein uppisjóvafiskur, alt árið og hetta gekk ikki út yvir yngulin hjá hýsu og toskastovnunum, hetta gekk ikki út yvir tilgongdina av hýsu og toski.

– Eg havi eisini kannað, um makrelur hevur verið í Føroyskum sjógvi fyrr. Heimildarfólk fortelja mær, at nógvur makrelur var á Vágsfirði undir krígnum og sama hava menn lagt merki til í Nólsoyarfirði nøkur ár seinni. Pápi mín Julius Steingrund, sum veiddi nógva sild á Skálafjørðinum, veit ikki um, at teir hava fingið makrel í gørnini.

– Hvør forkláringin er upp á, at so nógvur makrelur hevur verið undir Føroyum seinastu árini kann gitastum. Ein sannroynd er, at sjógvurin er nógv heitari nú, enn hann var fyrr og toskur og hýsa hava tað ikki so gott, tá ið sjógvurin er heitur.

## Fiska ikki burðardygt – Fiskidagaskipanin er góð, tá væl stendur til

– Seta vit okkum spurningin, hví tað stendur so illa til við botnfiskastovnunum undir Føroyum er svarið rættuliga einfalt í mínum eygum. Vit fiska ikki burðardygt. Ein góð fiskivinnuskipan skal leggja upp fyri vánaligum náttúruumstøðum og tað ger okkara fiskidagaskipanin ikki, sigur Petur Steingrund.

– Tey fyrstu árini við fiskidagaskipanini vóru botnfiskastovnarnir væl fyri. Men hesi seinastu sjey árini hava øll verið rakár og skipanin er ikki gjørd til hesar umstøður. Fiskidagaskipanin er góð, tá væl stendur til og ikki í rakárum.

– Seinna helvtin av hesum 19 árunum, vit hava havt fiskidagaskipanina, hava botnfiskastovnarnir verið rekord lágir í mun til eitt hundrað ára skeið. Hetta átti at latið eyguni upp hjá onkrum. Antin er galið við skipanina ella er galið við hvussu hon verður umsitin. Skipanin eigur at leggja upp fyri sveiggjum og tað ger hon ikki. Onkur klokka átti at ringt.

Petur Steingrund leggur ikki fingrarnar í millum og kemur við beinleiðis orðum.

## Fiskidagaskipanin

– Av teimum 19 árunum vit hava havt fiskidagaskipanina eru tey 9 seinastu katastrofuár. Stovnarnir hava ikki bara verið í minking, teir hava verið søguliga lágir.

– Og tað ringasta av øllum er, at vit læra einki av hesi støðuni. Tá ið fiskastovnarnir koma fyri seg aftur, er alt gloymt og vit hava einki lært. Tá skulu útróðrarbátar og línubátar, sum bankarnir hava hildið kunstiga á lívi, betala sína skuld aftur. Tað er nú, ongin fiskur er, at fiskidagarnir skulu minkast og takast burtur úr skipanini!, sigur hann

## Loysi byrðarnar av løgtinginum

Petur Steingrund heldur, at størsti veikleikin við fiskidagaskipanini er, at løgtingslimir á hvørjum ári skulu avgera hvussu nógvir fiskidagar skulu gevast. Tað er ein tung og álvarslig byrða, sum liggur á teirra herðum og teir eru ikki fiskifrøðingar og heldur ikki fakfólk á økinum.

– Vit skuldu heldur havt ein veiðusetning sum sigur, hvussu nógv vit skulu taka av stovninum og hetta eigur at henda í samstarvi við ICES. Og um vit brúka fiskidagar ella kvotur, fyri at røkka hesum setningi, tað havi eg onga meining um. Tá verður tað setningurin og ikki løgtingslimir, sum avgera trýstið á stovnarnar. Innast inni trúgvi eg slett ikki, at løgtingslimir eru so fegnir um at taka støðu til fiskidagarnar.

## Íslendingar fiskað burðardygt

– Okkara skipan leggur upp til, at triði hvør fiskur verður fiskaður, tað er øgiliga nógv og gongur bara tey allarbestu árini. Íslendingar hava fiskað burðardygt seinastu árini og teir hava ein veiðusetning, sum sigur 25 prosent av hvørjum fiskastovni um árið.

– Vit hava seinastu 50 árini tikið í miðal 37 prosent um árið av stovninum. Í árunum 1996-1997 tóku vit 50 prosent og vit vóru aftur í hæddini í 2002, tá tóku vit aftur annanhvønn fisk. Í fjør lá veiðutrýstið eftir botnfiski undir Føroyum um 20 prosent, og tað eigur ikki at fara nógv upp um tað.

– Hjá føroyingum er umráðandi at hava góðar og sterkar fiskastovnar, sum klára vánaligari náttúruumstøður. Ein sterkur stovnur klárar munandi betri, at náttúran svíkir rak ár, sigur Petur Steingrund.

| Djóraæti ) (g/m$^2$) | Stovnsstødd ('1000 t) 50 | 100 | 150 | 200 | 250 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 32 | 42 | 55 | 71 | 92 | 59 |
| 4 | 17 | 23 | 29 | 38 | 49 | 31 |
| 7 | 9 | 12 | 16 | 20 | 27 | 17 |
| 10 | 5 | 6 | 8 | 11 | 14 | 9 |
| Miðal | 16 | 21 | 27 | 35 | 46 | 29 |

*Árgangsstyrki hjá toski og hýsu (milliónir 2 ára gamlir fiskar eitt ár seinni) roknað út frá nøgd av djóraæti (reyðæti) og nøgd av vaksnum toski og hýsu.*

# Felags fatan av sildastovninum

Vísindafólk úr øllum fimm strandalondunum eru samd um, hvussu norðhavssildin ferðast, og harvið er lívfrøðiliga grundarlagið lagt undir samráðingar um býtið. – Útgangsstøðið fyri eini semju má nú metast at vera væl betri, sigur Eydna í Homrum, sum stýrdi serfrøðini seinasta strekkið á mál



Eydna í Homrum hevur stýrt samráðingunum

Í eitt ár hava vísindafólk úr Norra, Russlandi, Íslandi, ES og Føroyum kannað út í æsir útbreiðsluna av norðhavssild í Norðurhøvum. Úrslitið er ein 217 síður drúgv frágreiðing, sum kann gerast lykilin til eina nýggja strandalandaavtalu um býtið av norðhavssildini.

Arbeiði av hesum slag er ikki gjørt síðani 1995, og hóast dúgliga hevur verið víst á eitt broytt ferðingarmynstur, so hava prógvini haltað aftaná. Gamla sildabýtið, ið gav Føroyum 5,2 prosent av stovninum, elvdi sum kunnugt til so stóra misnøgd í Fiskimálaráðnum, at Føroyar brutu seg burtur úr gomlu avtaluni, ásettu sær egna sildakvotu og fingu eitt ES-boykott afturfyri. So við og við slætnaðu sjógvarnir tó aftur, og í juni undirskrivaði Jacob Vestergaard eina eitt ára avtalu við ES um norðhavssildina, sum gevur Føroyum rætt at fiska 40.000 tons í ár. Hóast væl nøgdur legði landsstýrismaðurin dent á, at sildaavtalan er bara galdandi í ár og ávirkar ikki komandi strandalandasamráðingar um framtíðar býtið av norðhavssildini.

Tað ger áður nevnda 217 síður drúgva frágreiðingin, ið føroyingar tóku stig til, harafturímóti:

– Frágreiðingin er eitt nýtt, felags, lívfrøðiligt grundarlag, sum vísindafólk úr øllum fimm strandalondum eru samd um, sigur Eydna í Homrum, Ph.D. í lívfrøði og granskari á Havstovuni.

Síðani í vetur hevur Eydna í Homrum verið forkvinna í vísindaliga verkabólkinum, sum hevur skrivað frágreiðingina. Stórur partur av arbeiðnum hevur verið at finna fram hagtøl og data, ið tilsamans geva eina mynd av sildastovninum og útbreiðsluni av honum síðani 1995. Bólkurin er stutt sagt farin ígjøgnum allar vísindaligar kanningar, sum eru gjørdar av hesum stovni hetta 20 ára tíðarskeið, og við støði í teimum teknað eina heildarmynd av útbreiðsluni og ferðingarmynstrinum hjá norðhavssildini tvørtum um sjóøkini hjá øllum fimm strandalondum. Afturat vísundaligu kanningunum hevur bólkurin brúkt veiðutøl, tó við ávísum fyrivarni. Broytingar í fiskiskapi, annar og meira attraktivur fiskiskapur eftir øðrum fiskasløgum umframt atgongd at fiska norðhavssildina hjá hvørjum øðrum gera, at veiðan fyri hvørt øki ikki beinleiðis kann tulkast sum umboðandi fyri nøgdina av sild í ymisku økjunum.




*Útbreiðslan av norðhavssildini er nógv broytt síðan góðu sildaárini í fimmti- og sekstiárunum. Søguliga savnaðist sildin um veturin á sonevnda „Reyða torginum" á markinum millum Føroyar og Ísland*

– Vísindaligu kanningarnar eru besta keldan at lýsa ferðingarmynstrið, tí tær hava ikki somu avmarkingar sum fiskiskapurin. Veiðutøl kunnu tó í ávísan mun brúkast í økjum og tíðarskeiðum, har kanningar ikki eru gjørdar, sigur Eydna í Homrum.

## Broytta ferðin

Tað er vísindaliga prógvað, at Barentshavið er krubban hjá norðhavssildini. Her livir norðhavssildin síni fyrstu 3-4 ár, áðrenn hon leitar sær út í Norðurhøv til vaksnu sildina, sum árliga ferðast millum gýtingarøki, beitiøki og vetrarøki. Eftir at sildastovnurin fór burtur í einki tíðliga í sjeytiárunum, var Ofotfjørðurin, sum liggur innan fyri Lofoten í Norðurnorra, savningarstað hjá øllum tí vaksna stovninum um veturin. Her var hennara vetrarøki. Tað mynstrið er tó broytt, sildin leitar sær ikki longur inn á fjørðin, men heldur í staðin til á opnum havi út fyri Troms í Norðurnorra. Aðrar, árligar kanningar sum hava verið gjørdar í gýtingartíðini í februar-mars staðfesta, at norðhavssildin hetta tíðarskeiðið heldur til, fram við stórum pørtum av norsku vesturstrondini. Sostatt staðfestir nýggja frágreiðingin, at vetrarøkið og gýtingarøkið hjá norðhavssildini framvegis burturav í norskum sjógvi. Men norðhavssildin hevur havt eitt umbroytiligt ferðingarmynstur hesi seinastu 20 árini. Hetta sæst millum annað við at sildin nú gagnnýtir føroyska økið í nøggv størri mun enn fyrr, tá hon leitar sær føði um summarið. Sildin er í føroyskum øki væl longri út á heystið.

– Árligu kanningarnar í maj-juni og juli-august staðfesta, at útbreiðslan av norðhavssildini er broytt munandi síðstu árini, og tað er eisini niðurstøðan í okkara frágreiðing, sigur Eydna í Homrum.

Felagskanningar, gjørdar í maijuni mánað í seinnu helvt av nítiárunum vístu eina mynd, har 50-60 prosent av norðhavsildini helt til í norskum sjógvi. Restin var at kalla øll at síggja í altjóða sjógvi norðanfyri. Men síðstu árini er myndin broytt. Felagskanningar í mai-juni vísa nú eina mynd, har umleið 30 prosent av norðhavssildini er í norskum sjógvi og onnur umleið 30 prosent í altjóða sjógvi norðanfyri. Harumframt er nú útvið 25 prosent av norðhavssildini at síggja í føroyskum sjógvi hetta tíðarskeið, meðan onnur 10 prosent eru í íslendskum sjógvi.

Líknandi felagskanningar í juliaugust vísa somuleiðis eitt munandi broytt ferðingamynstur. Nýggjastu kanningar hetta tíðarskeið vísa eina mynd, har meira enn 75 prosent av norðhavssildini er í íslendskum og føroyskum sjógvi í juli-august.

Eisini staðfestir nýggja kanningin, at nøgdin í ES-sjógvi er munandi minni enn í føroyskum øki, eins og frágreiðingin frá 1995 staðfesti.

– Samanumtikið kunnu vit siga, at norðhavssildin framvegis burturav er í norskum øki frá november til mars, meðan summarútbreiðslan er broytt, soleiðis at stórur partur av stovninum nú er í útsynningspartinum av kanningarøkinum, sigur Eydna í Homrum.

Talan er um eitt rættuliga stórt kanningarøki, ið fevnir um stóran part av Norðurhøvum.

Lívfrøðiliga gongdin í stovninum seinnu árini hevur gjørt sítt til, at norðhavssildin ferðast øðrvísi enn




*Árligar felagskanningar í mai-juni mánað síðstu mongu árini staðfesta, at útbreiðslan av norðhavssild er nógv broytt. Nú er stórur partur av stovninum í útsynningspartinum av kanningarøkinum um sumrarnar*

fyrr. Ungur fiskur og gamal fiskur hevur hvør sítt ferðingarmynstur.

– Vánalig tilgongd síðani 2005 merkir, at miðalaldurin í stovninum er høgur. Elsti fiskurin ferðast longst, tað veri seg suðureftir ella vestureftir, og henda gongd sæst aftur í okkara kanningum, sigur Eydna í Homrum.

Norðhavssildin er kynsbúgvin um fimm ára aldur, og kann gerast 25 ára gomul, men tað er sjáldan, at sild eldri enn 15 ár verður fiskað.

## Telvingin

Vísindaliga frágreiðingin er sum longu nevnt eitt nýtt, felags, lívfrøðiligt grundarlag, sum øll fimm strandalondini eru samd um. Fokus í frágreiðingini er á útbreiðsluna, á ferðingamynstrið hjá norðhavssildini, og ikki á nøgdir ella tonsatøl.

Sambært forkvinnuni í vísindaliga verkabólkinum eydnaðist tað at halda politikk burtur úr arbeiðinum.

– Kanska eri eg eitt sindur bláoygd í hesum samanhangi. Men eg havi veruliga ikki merkt nakað til politisk motiv hjá vísindafólkunum úr teimum ymsu strandalondunum, sigur Eydna í Homrum og heldur fram:

– Vit hava ongantíð keglast um setningar, ið møguliga kunnu seta eitt land í eina betri ella verri støðu. Tvørturímóti hava vit lagt okkum eftir at orða okkum varliga, har vandi hevur verið fyri politiskari tulking av okkara setningum.

Við felags frágreiðingini er eitt grundarlag lagt fyri komandi samráðingum um býtið av norðhavssildini. Hóast smærri tillagingar vórðu gjørdar í 2007, so tekur verandi býti støði í líknandi frágreiðing frá 1995, ið hevur staðið órørd síðstu stívliga 20 árini. Væntast kann eisini, at nýggja frágreiðingini skal standa í nógv ár frameftir.

Kanningar verða gjørdar leypandi fyri at finna út av, um ferðingarmynstrið og útbreiðslan broytast. Men tó er ikki vist, at tílíkar broytingar verða tiknar við í samráðingar millum strandalondini so hvørt.

– Nú henda frágreiðingin er latin inn, er hesin verkabólkurin endaður. Skulu dagføringar gerast, so skal nýggjur verkabólkur setast, greiðir Eydna í Homrum frá.

Hóast felags, lívfrøðiliga grundarlagið er komið upp á pláss við hesi frágreiðingini, so merkir tað tó ikki, at allar súðir eru syftar í strandalandasamráðingunum um, hvussu norðhavssildin í framtíðini skal býtast millum Norra, Russland, Ísland, ES og Føroyar.

Fleiri onnur atlit kunnu væntast at vera tikin við inn á samráðingarborðið. Eitt argument kann vera søgulig rættindi. Annað argument er Barentshavið, ið er krubban hjá sildini fyrstu 3-4 árini. Triðja argument er týdningurin, ið stovnurin hevur fyri einstaka landið, sonevnda „dependency-argumentið.“ Hesi og óivað onnur argument eru partur av tí politisku samráðing, ið nú fer fram um býtið av einum stovni, ið síðstu árini er minkaður somikið nógv, at ICES-tilráðingin um mest loyvdu veiðu í 2015 er komið niður á 283.000 tons. Somuleiðis vístu kanningar í mai eina framhaldandi niðurgongd í gýtingarstovninum. Vánaliga gongdin gerst sera sjónlig, um hugt verður aftur á ICES-tilráðingar síðstu árini. So seint sum í 2009 var mest loyvda veiða eftir norðhavssild meira enn 1,6 milliónir tons.

Hóast stovnurin í løtuni er lutfalsliga illa fyri, so er talan um sera avgerandi samráðingar, ið standa fyri framman. Tá semja er gjørd um býtið, so er støðið lagt og lutfallið millum strandalondini ásett. Eftirfylgjandi samráðingar hava tá vanliga snúð seg um, hvørt og í hvønn mun strandalondini eru sinnað at fylgja ICES-tilmælinum um mest loyvdu veiðu.

Eydna í Homrum er ikki nógv fyri at leggja seg út í politisku telvingina.

– Men við felags frágreiðingini má útgangsstøðið fyri eini semju nú metast at vera væl betri, sigur hon.




*Fyri 10-15 árum síðani var meira enn helvtin av norðhavssildini í norskum sjógvi í mai-juni. Nú er ferðingamynstrið broytt, soleiðis at væl størri partur av sildini stendur í altjóða sjógvi norðanfyri og eisini í føroyskum sjógvi hetta tíðarskeið.*

| FAKTA | |
|---|---|
| Tilráðing hjá ICES um mest loyvdu veiðu eftir norðhavssild: | |
| 2007 | 1.280.000 tons |
| 2008 | 1.518.000 tons |
| 2009 | 1.643.000 tons |
| 2010 | 1.483.000 tons |
| 2011 | 988.000 tons |
| 2012 | 833.000 tons |
| 2013 | 619.000 tons |
| 2014 | 419.000 tons |
| 2015 | 283.000 tons |



# Tá sildin hvarv

Ein óloysilig gáta, eitt mysterium. Soleiðis lýsti Eiler Jacobsen støðuna, tá sildin hvarv síðst í 1960'inum. Orsøkin er helst at finna í ovfisking og kaldari sjógvi í Norðurhøvum, metir fiskifrøðingur í dag.

– Vit høvdu mangar ferðir tosað um, at hon fór aldri at verða uppfiskað, líkamikið hvussu nógvir bátar royndu. So nógv hevði verið til. Alt havið út fyri íslendska Eysturlandinum hevði staðið mestsum fult av sild. Hetta var ein óloysilig gáta, eitt mysterium, vit als ikki fataðu. Nú vóru vit komnir til tómt hav við nýggjum skipi, so hetta vóru ikki tespilig útlit.

Orðini eru úr endurminningunum hjá Eileri Jacobsen, endurgivnar í bókini „Skálvíksdrongur Sildakongur“. Tey lýsa støðuna, soleiðis sum skiparin og reiðarin mintist hana at vera á heysti 1968.

Hetta heystið hvarv eitt ríkidømi, sum ár eftir ár hevði ríkað Norðurhøvini so dyggiliga. Sambært gomlum stovnsmetingum var gýtingarstovnurin av sokallaðu Atlanto-Skandisku sildini millum seks og 10 milliónir tons, øll fimmtiárini, stovnurin minkaði niður í eina helvt í sekstiárunum, men í 1968 var at kalla alt burtur.

– Norðhavssildin, sum vit kenna hana í dag, er ein partur av sokallaðu Atlanto-Skandisku sildini, ið reikaði í Norðurhøvum í stórum nøgdum fyrst í farnu øld til einaferð síðst í sekstiárunum, tá stovnurin minkaði niður í næstan einki, helst vegna ovfisking og vegna kølnandi sjóvarhita í Norðurhøvum, greiðir fiskifrøðingurin Jan Arge Jacobsen frá.

Henda sildin gýtti um várið við vesturstrond Noregs, og eisini gýtti ein lítil partur á bankunum eystan fyri Føroyar.

## Reyða torgið

Aftan á gýtingina fór sildin út á hav at leita sær føði, djóraæti, til einaferð út á heystið.

– Tá savnaðist hon aftur á vetrarøkinum úti á opnum havi millum Føroyar og Ísland. Tað var á sokallaða reyða torginum, sum er eitt øki á leið við miðlinjuna millum føroyska og íslendska markið, greiðir Jan Arge Jacobsen frá.

Sambært fiskifrøðinginum var sildin standandi her um veturin, í dvala í køldum sjógvi, til hon aftur byrjaði at ferðast eysturyvir móti gýtingarøkjunum fyrst í árinum. Yngulin rekur norður í Barentshavið, har hann veksur upp, og har heldur sildin til, líka til hon er kynsbúgvin um fimm ára aldur.

– Tá fer hon úr Barentshavinum og byrjar at ferðast við vaksna stovninum í Norðurhøvum.

## 1995-frágreiðingin

Tey fimm strandalondini hava higartil bygt býtið av norðhavssild á eina vísindaliga frágreiðing frá 1995, ið líkist aktuellu frágreiðingini, sum nú liggur á borðinum. 1995-frágreiðingin brúkti søguligan fiskiskap frá seinna heimsbardaga fram til 1970, umframt kanningar av útbreiðslu av Atlanto-Skandisku sildini, seinni nevnd norðhavssildin, til at lýsa útbreiðslu og ferðing.

– Av tí at sildin tá hevði vetrarøki so sunnaliga í Norðurhøvum høvdu føroyingar og serliga íslendingar góða atgongd at fiska sildina stóran part av árinum. Hetta spegladist aftur í søguligu veiðutølunum, og tískil eisini í sildabýtinum, sigur Jan Arge Jacobsen.

Gamla býtið gav Norra 61 prosent, Íslandi 14,5 prosent, Russlandi 12,8 prosent, ES 6,5 prosent og Føroyum 5,2 prosent av sildakvotuni.

**Talva yvir sildarveiði**

| Ár: | Ísland | Noreg | Sovjet | Føroyar | Tilsaman |
|---|---|---|---|---|---|
| 1950 | | 31.000 | 781.000 | 14.000 | 826.000 |
| 1951 | | 49.000 | 1.173.000 | 56.000 | 1.278.000 |
| 1952 | | 9.000 | 1.172.000 | 74.000 | 1.255.000 |
| 1953 | | 32.000 | 924.000 | 119.000 | 1.074.000 |
| 1954 | 15.000 | 1.432.000 | 170.000 | 28.000 | 1.644.000 |
| 1955 | 18.000 | 1.119.000 | 219.000 | 13.000 | 1.360.000 |
| 1956 | 41.000 | 1.349.000 | 245.000 | 24.000 | 1.659.000 |
| 1957 | 18.000 | 978.000 | 305.000 | 17.000 | 1.318.000 |
| 1958 | 22.000 | 545.000 | 401.000 | 18.000 | 986.000 |
| 1959 | 35.000 | 638.000 | 428.000 | 14.000 | 1.111.000 |
| 1960 | 27.000 | 592.000 | 472.000 | 11.000 | 1.102.000 |
| 1961 | 85.000 | 442.000 | 286.000 | 17.000 | 830.000 |
| 1962 | 176.000 | 452.000 | 311.000 | 10.000 | 949.000 |
| 1963 | 178.000 | 432.000 | 362.000 | 13.000 | 985.000 |
| 1964 | 367.000 | 530.000 | 366.000 | 18.000 | 1.282.000 |
| 1965 | 540.000 | 471.000 | 500.000 | 32.000 | 1.548.000 |
| 1966 | 691.000 | 724.000 | 469.000 | 61.000 | 1.966.000 |
| 1967 | 359.000 | 877.000 | 397.000 | 35.000 | 1.667.00 |
| 1968 | 75.000 | 423.000 | 196.000 | 16.000 | 712.000 |
| 1969 | 0,600 | 52.000 | 11.000 | 4.000 | 68.000 |

*Besta árið var 1966 og longu í 1969 funnu føroyingar so at siga onga Norðhavssild.*

# Pionerar á landleiðini



Bjarni í Skálum úr Vestmanna.

Nú hava vit við partroling staðfest, at tað ber til hjá okkum at fáa makrelin til høldar til besta prís og við minst møguligum útreiðslum. Tað gevur okkum góð kort í hondina til næsta býti, sigur skiparin á Skálafossi, Bjarni í Skálum.

*Eftir Gunnar Skúvadal*

Tað er kanska ikki heilt av leið at siga, at vit vórðu tvingaðir til at handla. Tað gekk so sum so við royndunum eftir botnfiski. Samstundis sóu vit við egnum eygum allan makrelin svimja rundan um okkum nærmast omaná sjónum. Tað var bara ikki honum, vit royndu eftir. So har var bara eitt at gera, og tað var at fáa tað at bera til, sum higartil hevði verið nærum ógjørligt.

Mið & Magn hevur heitt á Bjarna í Skálum, um at greiða nærri frá royndunum at partrola eftir makreli, sum teir á Skálabergi, sum er heimahoyrandi í Vestmanna, hava gjørt saman við systirskipinum Hansu Mariu, sum er heimahoyrandi á Toftum. Bátarnir eru smáir, um 20 metrar til longdar við eini bruttotonnagu uppá góð 100 tons og hava tí hvørki lastakapasitet ella maskinorku, sum er vælegnað til pelagiskan fiskiskap.

Men Bjarni í Skálum letur kortini stak væl at royndunum við partroling, sum eru gjørdar í ár.

## Tung byrjan

Bjarni gongur í fótafetunum hjá pápanum, Dánjal í Skálum, og umframt Skálafoss eiga teir eisini Vesturbúgvan. Burtursæð frá fyrstu árunum eftir 2005, tá teir fingu Skálafoss, hevur raksturin verið tungur. Úrslitið sæð yvir tíð, hevur ligið um 0, við høgum oljuprísum og vánaligum fiskaprísum; sum fyri teir eru óbroytiligar fortreytir. Og jú, tankin um bara at leggja bátin hevur spøkt í huganum, hóast tað ongantíð er komið so langt.

Tað byrjaði í smáum við makrelinum í 2010, men tey fyrstu tvey árini var tað mest snakk.

Einsamallir gjørdu vit onki, so vit skuldu hava ein at trola saman við. Eisini skuldi neyðug útgerð, eitt nú trol, útvegast. Í 2012 gjørdu vit so fyrstu royndirnar at fáa fiskin í trolið. Vit fingu staðfest, at tað ber væl til at fiska, men at hagreiða makrel umborð hjá okkum loysti seg ikki. Vit tóku eini 100 tons til lands, men veiðan hekk illa saman fíggjarliga. Tá nøgdirnar eru so smáar er neyðugt at prísurin er góður fyri hvørt kilo, men tað knípti hjá okkum at fáa góðan prís, tá vit tóku fiskin umborð at hagreiða.

Bjarni í Skálum greiðir frá, at hóast tað reint fíggjarliga gekk mest eftir reyv hesi fyrstu royndarárini, so dugdu teir væl at síggja, at her var talan um at ‚bróta nøtina' og finna fram til, hvussu tað, sum mátti bera til, reint praktiskt skuldi gerast.

Árið 2013 varð merkt av, at teir tá blivu koyrdir í bólk saman við teimum stóru at fiska av felagskvotu.

Tá myndugleikarnir sóu at lítið kom burturúr í 2012 koyrdu teir okkum í henda bólkin í 2013, og har formáddu vit okkum lítið. Vit duttu mestsum burtur ímillum, og heldur ikki tá kom nógv burturúr reint fíggjarliga. So vit trolbátar gjørdu vart við, at skuldi nøkur meining vera í hjá okkum at halda fram, so máttu vit hava okkara egnu kvotu at fiska av.

## Í 2014 glapp

Trolbátar á landleiðini fingu í ár tillutað 1.400 tons í eginkvotu, og tá tað var greitt, bleiv støðan ein heilt onnur. Ein lítil bátur sum fiskar av felagskvotu er ikki líka áhugaverdur hjá øðrum at samstarva við, sum ein lítil bátur, sum fiskar av egnari kvotu.

Royndirnar frá 2012 vístu okkum, at vit vóru væl egnaðir at fáa hendur á fiskin, men vit vóru ikki væl egnaðir at goyma hann umborð og hagreiða hann, tíansheldur fáa hann til lands. So vit vistu alla tíðina, at vit fingu tørv á breiðari samstarvi við aðrar. Tá tað eydnaðist at fáa Varðan í Gøtu at koma við sínum royndum, og teirri útgerðini, sum teir høvdu ment til sítt brúk, og har hugsi eg serliga um pumpuna, so var bara at fiska. Tað tók okkum í veruleikanum bara lutfalsliga fáar tímar at fiska til kvotan var uppi, greiðir Bjarni í Skálum frá.

Tað sum hevði størstan týdning fyri okkum var at fáa trolið afturav og hava tað í sjónum. Bátarnir og øll útgerðin hjá okkum er lítil og viðbrekin í mun til tungu útgerðina sum vanliga verður brúkt at fiska stóru nøgdirnar av pelagiskum fiski. Men saman við útgerðini hjá Varðanum, og har hugsi eg bæði um pumpuna, men sanniliga eisini um útgerðina umborð á Saksabergi, sum tók ímóti, til at síggja hvar fiskurin er og hvussu hann ferðast í mun til trolið, so vísti hetta seg at virka sera væl. Vit gjørdu tveir túrar sum tilsamans vardu einar 100 tímar og tá liðugt var vóru 830 tons komin til høldar. Og tað eru vit stak væl nøgdir við.



Skálafossur hevur eina bruttotonnagu uppá góð 100 tons

Bjarni í Skálum nevnir fleiri ferðir vælvildina, sum teir fingu frá størru reiðaríunum, fyrst og fremst Varðanum í Gøtu.

Í teirra verð var talan jú um sera lítlar nøgdir, men eg billi mær inn, at tað fyri teir eisini var áhugavert at gera hesar royndirnar, tí veiðan gav besta kvalitet og harav eisini besta prísin. Fiskurin varð pumpaður beint umborð á Saksaberg og var ongantíð kroystur ella skalaður á annan hátt. Tað fíggjarliga høvdu vit sjálvsagt eisini gjørt avtalu um við teir, áðrenn vit fóru undir hetta, so allir tríggir vistu, hvat okkara partur var.

## 5-6000 tons

Bjarni í Skálum er eisini formaður í felagnum Trolbátar. Og tað verður við tí kaskettinum á høvdinum, at næsta takið nú skal takast. Tí tað er ongin loyna, at smáu lemmatrolararnir, sum ikki hava somu møguleikar sum aðrir at fara á fjaru leiðirnar at royna, vilja hava sín náttúrliga part av kakuni, nú stór virði eru at royna eftir í føroyskum sjógvi.

Tað hevði verið hóskandi fyri okkara reiðarí, um vit høvdu eini 500 tons til okkum sjálvar, ella eini 5.000 til 6.000 tons til allan bólkin. Tað skuldi verið nátúrligt, nú vit hava prógvað, at vit kunnu fáa mest burturúr fyri minst møguligar útreiðslur, og hevði verið eitt sera gott ískoyti til okkara vanliga rakstur eftir botnfiski.

Ikki bara Skálafossur og Hansa Maria royndu seg við partroling eftir makreli í summar. Tað gjørdi eitt annað par eisini, nevniliga Fiskaklettur og Karin Maria. Teir brúktu tó ikki pumpu, men høvdu posa í trolinum, og góðu so trolið alt til móttøkuskipið sum tók tað inn.

## Gott ískoyti

Kanska ein fimtingur av bruttovinninginum hjá Skálafossi kemur í ár frá makrelinum. Og tá skal havast í huga, hvussu stutta tíð tað tók at fiska hendan makrelin. Tað er avmarkað, hvussu nógvar útreiðslur tú kanst hava í so stutta tíð, sum Bjarni í Skálum sigur. Eg haldi eg tori at siga, at ongin annar skipabólkur hevði so nógv eftir per kilo sum vit. Havi eg skilt tað rætt, so er tað soleiðis, myndugleikarnir vilja hava tað. At fáa sum mest burturúr við so lágum útreiðslum sum gjørligt. Og tað fara vit sjálvandi eisini at leggja fyri myndugleikarnar, nú áðrenn endaliga býtið verður ásett fyri fiskiskapin næsta ár.

Afturmeldingarnar, sum vit fingu frá móttøkuskipinum, vóru eisini tær, at hetta, sum vit gjørdu, riggaði fult so væl sum hjá størru skipunum, sigur skiparin á Skálafossi.

Dánjal í Skálum ivast ikki í, at tíðin á ein hátt arbeiðir fyri teir, sum nú hava prógvað, at tað ber væl til at fáa nógv meira av makrelinum til matna, og sleppa undan, at so nógv fer fyri nærum ongan prís.

Vit fara sjálvandi at leggja dent á hetta, at úrtøkan hevur verið millum tær bestu, um ikki tann besta fyri hvørt kilo. Og eg haldi, at vit í tilgondini at fáa okkara part av kakuni sum eina trivaliga eginkvotu, fara at leggja dent á hetta. Dánjal í Skálum vísir á, at teirra bólkur seinastu árini er minkaður niður í eina helvt, og av teimum, sum enn eru í drift, hava fleiri eigaraskifti verið, umframt at fleiri bara hava ligið í seinastuni og ikki verið til fiskiskap.

Skulu myndugleikarnir gera, sum teir sjálvir siga, so ber ikki annað til enn, at okkara royndir fara at enda við størri part av kvotunum í okkara part.




Vinnukundadeildin í Eik

# Tryggja tær arbeiðsfrið

Fá tíð til tað, sum hevur týdning fyri tína fyritøku, við góðari og skjótari ráðgeving.

Símun er vinnukundaráðgevi í Eik. Sum partur av fiskivinnutoyminum hevur hann innlit í og áhuga fyri tørvinum og dagligdegnum hjá kundum sínum.
Vit arbeiða eftir meginregluni um, at góð ráðgeving og skjótar svartíðir tryggja, at tín tíð og tín orka verða brúktar til títt virksemi.

www.eik.fo tel. 348000



**Maskinistur** | **Maskinmeistari** | **Skipari** | **Skipsførari**



# Spennandi og fjølbroyttar útbúgvingar

## og eitt hav av eftirútbúgvingarmøguleikum

**Dømi um skeið:**

1. ARPA skeið
   ARPA Automatic Radar Plotting Aids
2. GOC (Generelt og endurnýggjan)
   GOC General Operator Certificate (NEW)
3. Tankers Safety serskeið fyri olju-gas- og kemikaliutangakip
   Tankers Safety, special course for oil-, gas- and chemical tankers
4. Flutningur av vandamiklum farmi
   Transport of dangerous goods in dry cargo ships
5. Eftirútbúgving sum sjúkraviðgeri (Heilsulæra)
   Supplementary training in medical proficiency
6. ECDIS (elektroniskt sjókort)
   Course in Elektronic Cart Display Indication System
7. SSO-skeið
   Course for Ship Security Officers
8. Fult trygdarskeið fyri sjómenn. STCW A-VI/1-1,A-VI/1-2, A-VI/1-3,A-VI/1-4
   Basic safety training
9. Bátaføraraskeið. STCW A-VI/2-1
   Proficiensy in Servival Craft and Rescue boats
10. Bridge Resource Management
    Bridge Resource Management

*Set teg í samband við skúlan og hoyr nærri.*

Nóatún 7 · FO-100 Tórshavn
Tel 350 250 · Faks 350 251
info@vh.fo · www.vh.fo

**VINNUHÁSKÚLIN**
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Vinnuháskúlin er ein nútímans skúli við serkønum lærarum í øllum lærugreinum, eins og skúlin hevur allar teir hentleikar og útbúnað, sum skulu til fyri at gera útbúgvingina áhugaverda og góða. Útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstyrelsen og IMO.

# Tørvur á nýggjum fiskileiðum

1. september 1958 fluttu íslendingar sítt fiskimark út á 12 fjórðingar og føroyska veiðan innanfyri fiskimarkið bleiv steðga.. Hetta var ein dyggur smeitur fyri ein stóran part av føroyska fiskiflotanum. Nú var neyðugt at finna nýggjar fiskileiðir.



*Í 1950 sendi Kjølbro 10 hvítmálaðar útróðrarbátar yvir til Grønlands at fiska.*

Á veg heim úr Vesturgrønlandi í 1957 royndi Viðoyggin dygst inni við land eystanfyri Hvarvið. Har fingu teir nógvan góðan tosk.

Her eigur eisini at vera nevnt, at Grønlandshandilin skipaði – heystið 1958 – fyri eini fiskiroynd í Angmagsalikkfjørðinum, har grønlendingar róðu út við 50 bátum frá skipinum „Kaskelot" og høvdu fingið væl. Róð varð út við heilt smáum bátum, nakrir vóru bygdir í Føroyum.

Hálvan august 1958 fór Richard Jacobsen við Viðoynni og Julius á Syðradali við Fugloynni yvir á Hvarvið at royna. Tá teir komu yvir, lág Martin Olsen í Søldarfirði har við donsku skonnartini Herthu. Allir lótu teir væl at fiskiskapinum og fiskaslagnum, og havnirnar vóru góðar.

Tá hetta frættist vóru fleiri, sum høvdu hug at royna fiskiskap á hesum leiðum. Ein teirra var Kvívíkar Tummas. Hann fór úr Føroyum um ólavsøkumundið 1959 við sandavágstrolaranum Venus at royna við útróðrarbátum. Og tá ein vika var farin av august sendi Kjølbro 10 útróðrarbátar yvir við farmaskipinum Karin K, sum skuldi virka sum móðurskip. Og Vestmannatrolarin Gullfinnur fór somu leið.

## Kvívíkar Tummas og Venus

Á ferðini yvir noyddist Venus at fara inn í Vestmannaoyggjunum at tetta ein leka, og haðani løgdu teir í havið aftur 3. august. Skjótt gekk yvir, og einar 20-25 fjórðingar úti sá havið stórsligið út. Teir taldu upp í 15 stórhvalir í flokk, fyri uttan smærri hval, og hóp av havskrápi. Tað er tað, sum føroyingar plaga at hava gott álit á, hevur Kvívíkar Tummas hevur greitt frá.

Tveir dagar lógu teir í fagrasta veðri og trokaðu ígjøgnum ísbrúnna, og tá teir vóru komnir inn í fjarðakjaftin í Angmagsalikkfjørðinum, var eisini fult av ísi. Tað tók teimum tveir dagar, til teir lógu til akkers í Kulusuk, sum liggur á norðara armi í Angmagsalikkflógvanum.

## Departementstjóri hóttir Tummas

Í Kulusuk rendi Tummas seg í trupulleikar; longu dagin eftir, at teir vóru komnir komu departementstjórin í grønlandsmálaráðnum í Keypmannahavn, Eske Brun, og kolonistjórin, Norckesen, umborð á Venus at hitta skiparan. Eske Brun gjørdi Tummasi greitt, at her hevði hann ikki loyvi at fiska, men Tummas helt uppá, at her var frítt hjá honum at fiska. Men tað gjørdi alt tað sama, og Eske Brun hótti Tummas við, at fór hann at fiska á hesum leiðum, so kundi hann vera handtikin. Tummas bað um at fáa tað skrivligt, og tað fekk hann.

Men hann rýmdi kortini ikki. Hann helt tað vera nakað løggut at seta kós aftur til Føroya og ikki hava kastað snørið, so hann boðaði frá, at hann fór at fiska um tveir dagar.

Fiskað varð við bátum, men teir sluppu ikki langt fyri ísi, kortini fingu teir eitt sindur.

Nú hendi so tað, at ein bátur við eftirlitsmonnum umborð, varð bundin uppá síðuna á Venus, og fjórða hvønn tíma varð fjarrit sent til landshøvdingin í Godthåb.

Og ein dagin kom fjarrit frá til Tummas frá Peturi Mohr Dam, løgmanni. Løgmaður bað Tummas sleppa sær burtur haðani í stundini. Tummas var treiskur og svaraði løgmanni, at hann fór ikki.

Endin var kortini, at Tummas gav skarvin yvir, men hann ivaðist ikki í, at hendan leiðin við Angmagsalikk var rík til fisk.

## Angmagsalikkleiðin

Føroysku skipini høvdu øll ætlað at roynt á Angmagsalikkleiðini, men teir fingu nógvar trupulleikar og lítlan fisk. Størsti trupulleikin var, at hetta var óvanliga ringt ár til ís.

Kvívíkar Tummas hevur greitt frá, at tað fleiri ferðir kom fyri, at so stórar torvur komu inn undir ísin, at menn ikki orkaðu at draga meir enn tað beit; teir kundu fáa bæði 10 og 15 fiskar á. Tá ið tær stóru torvurnar komu, var tað tann ektaði norðurlands- og vesturlandstoskur, sama slag, sum livdi frá Halanum til Skagabankan, men hann var ongantíð meira enn ein dag, so rýmdi hann, helst tí, at har var ov líti av føði.

## Karin K við 133 monnum

Sum nevnt var Karin K farin við 10 útróðrarbátum. Karin K og bátarnir høvdu 133 mans, og øll bygdin hevði fylgt manningunum á teimum hvítmálaðu útróðrarbátunum avstað, tá fylgi legði út av Klaksvíkini 8. august við Karin K á odda.

Eisini teimum gekst striltið at sleppa inn móti landi fyri ísi. Á leiðini krokaðu teir í Íslandi, og 15. august vóru teir komnir inn móti Skjoldungen, men sluppu ikki inn um, fyrr enn dagin eftir.

Men har gjørdist lítið. Veðurlíkindini vóru ring, og ísurin tarnaði illa. Tá veðrið var so frægt, var at koma sær í onkran hyl, har mest sum onki var millum bátarnar. Tá frægast visti við, var onkur hylur kanska so stórur sum úr Kunoyarnesi heim á Sand í Klaksvík, greiddu menninir frá.

Í aðrar mátar møtti hendan royndin ongum trupulleikum, bert vælvild, lótu teir at. Høvdu líkindini verið betur, ivaðust heldur ikki teir í, at teir høvdu kunnað fingið væl av fiski.

## Ein miseydnað ferð

Tá saman um kom, høvdu bátarnir hjá Karin K fingið 200 tons í saltfiski. Ikki so lítið av hesi veiðini fingu teir tríggjar góðveðursdagar, tá teir fingu millum 37 og 58 tons í ráfiski.

Fyrrapartin 27. September fóru Karin K og teir 10 útróðrarbátarnir úr Angmagsalikk, og kl. 7 um kvøldið vóru tey øll komin út um tríggjar ísbrýr.

Veðrið var ruskut til Íslands. Lagt var inn á Keflavík at kroka, og 6. oktober vóru teir aftur í Klaksvík.

Fyri p/f J. F. Kjølbro miseydnaðist ferðin fíggjarliga.

Vestmannatrolarin Gullfinnur kom ongantíð aftur úr Eysturgrønlandi. Hann misti skrúvuna og bleiv fastur í ísinum. Manningin noyddist at fara av skipinum, sum skrúvaðist niður.

## Manningarfeløgini skipa fyri fundi

19. november 1959 skipaðu manningarfeløgini fyri fundi á Hotel Hafnia har tosað varð um, hvat gerast kundi fyri at økja um fiskileiðirnar hjá føroyingum.

Feløgini høvdu avrátt, at tosast skuldi um trý mál. Tað fyrsta var spurningurin um fiskirættindi í Grønlandi, annað var føroyska fiskimarkið, og triðja var at sleppa at fiska við snøri undir Íslandi.

Nógvir høvdu orðið og menn vóru á einum máli um, at føroyingar áttu at hava óskerdan rætt at fiska við húki allastaðni í Grønlandi.

Úrslitið av fundinum var ein samtykt, har harðliga var átalað, at feløgini heilt høvdu verið hildin uttanfyri tær samráðingar og sáttmálagerðir, sum hetta árið høvdu verið um veiðirættindini í Grønlandi.

Feløgini søgdu, at sáttmálin loysti ikki teir trupulleikar, sum føroysk fiskiveiða nú var komin í, men kundi gera fiskivinnuni og vinnulívinum stórri skaða enn gagn. Nevnt var, at veiðimongdin hetta árið var bert tveir triðingar av veiðimongdini í 1958.

*Í 1958 fóru Viðoyggin og Fugloyggin á Hvarvið at royna.*



# Oljupallurin West Hercules

Oljupallurin West Hercules, sum var til umvælingar á Skálafjørðinum í seks vikur í summar, sigldi sjálvur vestur í hav ímóti Kanada. Pallurin skal bora í Ný Foundlandi fyri Statoil. Roknað verður við, at tað arbeiði fer at taka hálvtannað ár.

Umvælingarnar í Føroyum vóru ikki lidnar, tá pallurin fór av Skálafjørðinum. Tí vóru fleiri handverkarar frá PAM Offshore Service við umborð, tá pallurin fór úr Føroyum. Handverkararnir skuldu arbeiða umborð meðan siglt varð til Ný Foundlands.

Arbeiðið, sum Pam Offshore Service og MEST gjørdu umborð á West Hercules varð kosið at vera ársins átak á Vinnudegnum í Norðurlandahúsinum. Mett verður, at arbeiðið, sum føroyingar gjørdu umborð fevndi um tíggjutals milliónir krónur.

Tað er norska reiðaríið Seadrill, sum eigur West Hercules. Talan er um eitt tað størsta reiðaríið í Norra.

Seadrill eigur 8 boripallar: West Alpha, West Elara, West Epsilon, West Hercules, West Linus, West Navigator, West Phoenix og West Venture. Her eigur eisini at vera nevnt, at tað ikki hevur verið møguligt hjá reiðarínum at finna arbeiði til allar pallarnar, og tað er ein stórur trupulleiki hjá reiðarínum.

**Nøkur tøl um West Hercules:**

**Skipaslag:** SS
**Bygdur:** 2008
**Motororka:** knapt 40.000 kw. (6 míl)
**Mesta starvsfólkatal umborð:** 180
**Longd:** 382 ft.
**Vídd:** 317 ft.
**Operation draft:** 75.5 ft.
**Pedestal krani 1:** 75 M.T.
**Pedestal krani 2:** 75 M.T.
**Pedestal krani 3:** 40 M.T.
**Riser handling krani:** 40 M.T.






# MERKTUR FISKUR

**Um merktur fiskur verður fiskaður, ynskir Havstovan upplýsingar um:**

- Merkjanr.
- Fiskidato
- Position
- Fiskalongd
- Skip
- Innsendara
- Búðstað
- Kontonr.


Spagettimerki


Goymslumerki

**Um til ber, ynskir Havstovan at fáa fiskin við eisini.**

**Afturfyri fær innsendarin bæði pening og lutaseðil/-ar, alt eftir um merki ella merki + fiskur verða latin inn.**

Lutakast er um **kr. 12.500,-** hvørt heyst

## FINNINGARLØN:

| | Merki | Merki + fiskur |
|---|---|---|
| Spagettimerki | Kr. 50,- + 1 lutaseðil | Kr. 125,- + 3 lutaseðlar |
| Goymslumerki | Kr. 125,- + 1 lutaseðil | Kr. 375,- + 3 lutaseðlar |
| | | + Kilopris fyri innlatnan fisk |



*Seinastu árini hevur Havstovan merkt tosk, hýsu, havtasku, kalva og svartkalva*





HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

P.O. Box 3051 · Nóatún 1
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 35 39 00
hav@hav.fo
www.hav.fo

↘ betri.fo




**Viðgerðartrygging er trygging, sum tryggjar tær eina skjóta og góða viðgerð, um tú gerst sjúk/ur ella ert fyri vanlukku.**

**Við hesi trygging verður tú effektivt og trygt leidd/ur gjøgnum sjúkravgerð, skurðviðgerð og eftirviðgerð.**
Mølholm Forsikring A/S tekur sær av at fáa tær eina tíð á privatsjúkrahúsi ella privatum viðgerðarstovni, sum hevur serkunnleika. Allar vanligar útreiðslur hjá góðkendum viðgerðarstovnum í Føroyum, Danmark, Skandinavia og Týsklandi eru umfataðar í hesi trygging. Tú kanst velja at víðka tryggingina til eisini at umfata flogferðaseðil millum Føroyar og Danmark aftur og fram.

**Vend tær til okkum á telefon 345700 ella betri@betri.fo og hoyr meira um okkara Viðgerðartrygging.**





TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón